# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Frágreiðing

## um ávísar stovnar og grunnar og tilknýti teirra til fíggjarlóg og landsroknskap

latin

løgtingsgrannskoðarunum

OKTOBER 2007

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo
www.LG.fo

# Innihaldsyvirlit

1 INNGANGUR 5

2 SAMANDRÁTTUR 7

3 GRUNDLEGGJANDI IVAMÁL UM FÍGGJARLÓG OG LANDSROKNSKAP 9

3.1 IVI UM ÁSETINGAR Í STÝRISSKIPANARLÓGINI OG ROKNSKAPARLÓGINI 9
3.2 LØGMAÐUR TEKUR MÁLIÐ UPP Í 1998 9
3.3 LANDSSTÝRISMAÐURIN Í FÍGGJARMÁLUM TEKUR MÁLIÐ UPP Í 1999 10
3.4 ÁLIT FRÁ FÍGGJARMÁLARÁÐNUM Í NOVEMBER 2001 10
3.5 SAMSKIFTI VIÐ LØGMANN Í 2002 11
3.6 FUNDUR MILLUM LØGMANN OG LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR Í 2003 12
3.7 SAMSKIFTI VIÐ LØGMANN 2004 - 2006 12
3.8 UPPSKOT TIL LØGTINGSLÓG "UM LANDSINS JÁTTANARSKIPAN" Í 2006 13
3.9 NÝSKAPANDI LÓGARGREINIR Í LÓGARUPPSKOTINUM 13
3.10 LÓGARUPPSKOTIÐ FALL BURTUR 15
3.11 TILMÆLI TIL LØGTINGSFORMANNIN Í 2006 15
3.12 TILMÆLI TIL LØGMANN OG LANDSSTÝRISMANNINUM Í FÍGGJARMÁLUM Í 2007 15

4 TILMÆLI UM BROYTINGAR Í LANDSROKNSKAPINUM 2006 17

4.1 FÍGGJARSTØÐAN, "KAPITALINNSKOT" 17
4.2 FÍGGJARSTØÐAN, VIRÐISBRØV (PARTABRØV) 17
4.3 FÍGGJARSTØÐAN, "EKSTERNIR GRUNNAR" 18

5 STØÐUTAKAN TIL AÐRAR BROYTINGAR 21

5.1 STOVNAR/GRUNNAR 21
5.2 EKSTERNIR GRUNNAR 22
5.3 INTERNIR GRUNNAR, AVTØKA 23

6 STOVNAR/GRUNNAR UTTAN FYRI FÍGGJARLÓGINA OG LANDSROKNSKAPIN 25

6.1 VIRKSEMI IKKI VIÐ Á FÍGGJARLÓGINI 25
6.2 FYRISITINGARÚTREIÐSLUR IKKI VIÐ Á FÍGGJARLÓGINI 25
6.3 STOVNAR/GRUNNAR IKKI VIÐ Í LANDSROKNSKAPINUM 26
6.4 BERT TRÍGGIR STOVNAR/GRUNNAR GRANNSKOÐAÐIR SAMBÆRT § 45 Í STÝRISSKIPANARLÓGINI 26

7 EKSTERNIR GRUNNAR 27

7.1 SØGULIG GONGD 27
7.2 EKSTERNIR GRUNNAR 2005 28
7.3 LÓGARÁSETINGAR 29

8 INTERNIR GRUNNAR 31

8.1 SØGULIG GONGD 31
8.2 INTERNIR GRUNNAR 2006 32

9 FYLGISKJAL 1: STOVNAR/GRUNNAR, FÍGGJARSTØÐAN 2006 35

10 FYLGISKJAL 2: PARTABRØV, FÍGGJARSTØÐAN 2006 36

11 FYLGISKJAL 3: EKSTERNIR GRUNNAR, FÍGGJARSTØÐAN 2006 37

12 FYLGISKJAL 4: STOVNAR/GRUNNAR, VIRKSEMI OG FYRISITINGARÚTREIÐSLUR 38

13 FYLGISKJAL 5: EKSTERNIR GRUNNAR, VIRKSEMI OG FYRISITINGARÚTREIÐSLUR 2006 39

14 FYLGISKJAL 6: STOVNAR/GRUNNAR, LÓGARÁSETINGAR 40

15 FYLGISKJAL 7: EKSTERNIR GRUNNAR, LÓGARÁSETINGAR 42

# 1 Inngangur

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava seinastu 10-15 árini javnan gjørt vart við, at fleiri stovnar/-grunnar eru ikki við á fíggjarlógini og í landsroknskapinum, og at tað er ivasamt, um grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan verða hildnar.

Í frágreiðingini verður m.a. greitt frá:

- søguligu gongdini í hesum drúgva máli
- hvørjar stovnar/grunnar ivamálini snúgva seg um
- hvussu fíggjarstøðan í landsroknskapinum 2006 kundi verið sett upp
- hvørjar inntøkur, skattir og útreiðslur liggja uttanfyri fíggjarlóg og landsroknskap
- hvussu ymiskar lógarásetingarnar eru um roknskap og grannskoðan

Landgrannskoðanin vónar, at frágreiðingin kann vera við til at varpa ljós á og loysa nøkur av ivamálunum, ið eftir eru á hesum øki.

Argir, 26. oktober 2007

Leivur Harryson

## 2 Samandráttur

Í áravís hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir víst á fleiri grundleggjandi ivaspurningar, tá ræður um játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti:

- um allar inntøkur landsins eru við í landsroknskapinum,
- um allar ognir og øll skuld er við í landsroknskapinum,
- um allir skattir/øll gjøld verða kravd inn sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini,
- um allar veitingar og umsitingarútreiðslur verða goldnar við heimild í fíggjarlógini,
- um allir stovnar/grunnar verða grannskoðaðir og lagdir fyri tingið sambært galdandi lóggávu.

Úrslitið er, at hvørki løgtingið ella almenningurin hava nóg fullfíggjaðar upplýsingar, tá ið støða skal takast til landsins fíggjarviðurskifti.

Bæði løgmaður og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava til fánýtis roynt at loyst allar hesar ivaspurningar. Í einum áliti frá Fíggjarmálaráðnum í 2001 verða ymisku grunnarnir viðgjørdir á ein skipaðan hátt, og støða verður tikin til ognarrætt og tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap umframt grannskoðanarviðurskifti. Álitið førdi við sær, at fleiri ivaspurningar vórðu loystir, men ikki allir.

Í fleiri uppskotum til samtyktar hava løgtingsgrannskoðararnir síðani víst á, at málið um tilknýtið hjá nøkrum landsstovnum/-grunnum til fíggjarlóg og landsroknskap tykist vera endað sum ein løgfrøðiligur stríðsspurningur um niðurstøðurnar í álitinum, sum Fíggjarmálaráðið gjørdi í 2001.

Eftir uppskoti frá Fíggjarnevndini setti løgtingsformaðurin tí í mars 2005 eina serfrøðinganevnd at fyrireika uppskot til lóg, ið kundi loysa hesi ivamál og aðrar trupulleikar við verandi játtanarskipan.

Í februar 2006 lat arbeiðsbólkurin løgtingsformanninum álit, og í mars 2006 legði løgtingsformaðurin fram uppskot til løgtingslóg “um landsins játtanarskipan” (Lm. nr. 81/2005). Lógaruppskotið varð beint í serliga § 25 nevnd.

Undir 1. viðgerðini í Løgtinginum var tvídráttur ímillum tinglimir um m.a. skattaallýsingina við atliti at Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Arbeiðsloysisskipanini, og tað var helst ein orsøk til, at lógaruppskotið ikki kom aftur úr nevnd, áðrenn Tingið fór heim í mai 2006. Málið fall tí burtur.

Í oktober 2006 mælti Landsgrannskoðanin til fánýtis løgtingsformanninum til at reisa tingmálið “um landsins játtanarskipan” av nýggjum.

Í einari frágreiðing í mars 2007 greinaði Landsgrannskoðanin hetta mál, lýsti støðuna í dag, og mælti løgmanni og landsstýrismanninum í fíggjarmálum til:

- at gera ávísar broytingar í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum 2006,
- at taka støðu til, um virksemi og/ella fyrisitingarútreiðslur hjá ávísum stovnum og grunnum skal við á fíggjarlógina,
- at samskipa lógarásetingarnar um roknskap og grannskoðan.

Løgmaður svaraði ongantíð. Landsstýrismaðurin svaraði í juni 2007, at Fíggjarmálaráðið fer saman við Gjaldstovuni at viðgera tilmæltu broytingarnar í landsroknskapinum 2007.

3 mia.kr. ikki við á fíggjarstøðuni í landsroknskapinum 2006

Í frágreiðingini niðanfyri verður m.a. víst á, at um støðið verður tikið í álitinum frá Fíggjarmálaráðnum í 2001, eru grunnar við einari samlaðari eginogn um 2,3 mia.kr. ikki við á fíggjarstøðuni.

Partabrøvini í landsroknskapinum eru helst undirmett við um 0,4 mia.kr., og sokallaðu "eksternu grunnarnir", um 0,3 mia.kr., eru ikki taldir við í fíggjarstøðuni.

Samanlagt eru virðir fyri einar 3 mia.kr., netto, ikki tald við í fíggjarstøðuni 2006.

Inntøkur og útreiðslur ikki við á fíggjarlóg og í landsroknskapinum

Stórar upphæddir liggja uttanfyri fíggjarlóg og landsroknskap. Vísandi til frágreiðingina er í 2006 talan um 266 mió.kr. í skatti og avgjøldum, um 141 mió.kr. í rentuinntøkum o.t., um 48 mió.kr. í rentuútreiðslum. Haraftrat er talan um 169 mió.kr., ið eru tilskot til einstaklingar, um 17 mió.kr. í lønum og um 13 mió.kr. í øðrum fyrisitingarútreiðslum.

Fyrisitingarútreiðslurnar at reka Landsbankan, Húsalánsgrunnin og Føroya Realkredittstovn verða fíggjaðar við einum rentumarginali. Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin og Arbeiðsloysisskipanin krevja gjøld (skatt) frá lønmóttakarum og arbeiðsgevarum. Hesir grunnar/stovnar hava tí í veruleikanum "óavmarkaðar" møguleikar at økja fyrisitingarútreiðslurnar uttan fyri ræði Løgtingsins.

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Landsstýrið setir sær spurningin, hví fyrisitingarútreiðslur hjá Føroya Realkreditstovni, Húsaláns-, Bjálvingarstuðulsláns-, Íbúða- og Búnaðargrunninum, Landsbanka Føroya, Vinnuframagrunninum, Arbeiðsloysisskipanini o.ø. ikki verða játtaðar á fíggjarlógini. Er tað tilvitað ella av tilvild?

Umframt spurningin, um tað er "lógligt", at hesar inntøkur og útreiðslur liggja uttan fyri fíggjarlógina, heldur Landsgrannskoðanin tað eisini vera ein spurning, um tað er skilagott og ynskiligt, at júst hesar fyrisitingarútreiðslur liggja uttan fyri ræði Løgtingsins. T.d. hava aðrir líknandi stovnar serstaka játtan á fíggjarlógini til fyrisiting:

- Stuðulsstovnurin til at fyrisita eina lóg um stuðul og lán til lesandi.
- Almannastovan og Hjálpartólamiðstøðin til at fyrisita stuðul og lán.
- Toll- og Skattstova Føroya til at fyrisita lógir um skatt og avgjøld og ymiskar stuðulsveitingar o.s.fr.

Roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti

Í frágreiðingini verður eisini víst á, at sera ymiskar lógarásetingar eru um roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti, og Landsgrannskoðanin mælir til at endurskoða og samskipa lóggávuna á hesum øki.

Hóast tað er ásett í § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini, verða fleiri roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap, ikki grannskoðaðir og lagdir fyri Løgtingið á sama hátt sum landsroknskapurin.

# 3 Grundleggjandi ivamál um fíggjarlóg og landsroknskap

## 3.1 Ivi um ásetingar í stýrisskipanarlógini og roknskaparlógini

Í mars 1994 samtykti Løgtingið fyri fyrstu ferð eina lóg um roknskaparviðurskifti landsins, har tað í § 1, stk. 1, er ásett, at Landsstýrið skal leggja fyri tingið ein samlaðan landsroknskap, sum skal fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins umframt aktiv og passiv landsins. Í § 1, stk. 2, er ásett, at landsroknskapurin í uppsetingini skal fylgja fíggjar- og eykajáttanarlógum fyri árið.

Sostatt kann verða sagt, at við roknskaparlógini og stýrisskipanarlógini er ásett, at alt virksemið hjá "Landsstýrinum" og hjá øllum landsstovnum skal verða játtað á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, og at ein samlaður landsroknskapur skal verða gjørdur, sum fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins umframt aktiv og passiv landsins.

Sambært § 45, stk. 2, í stýrisskipanarlógini er álagt løgtingsgrannskoðarunum at "*ansa eftir, at allar inntøkur eru settar í roknskapin, og at ongin útreiðsla er hildin uttan heimild í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg*".

Sambært § 45, stk. 1, er álagt løgtingsgrannskoðarunum at fara ígjøgnum árliga landskassaroknskapin, og sambært stk. 4 eisini "*roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap*". Ongin greið lýsing er av, hvørjir hesir almennu stovnar eru, sum hava "sjálvstøðugan" roknskap. Í viðmerkingunum í stýrisskipanarálitinum stendur einans: "*Í stk. 4 er ásett, at reglurnar eisini eru galdandi fyri landsstovnar, sum hava sjálvstøðugan roknskap, t.d. Telefonverkið, Apotekið og Rúsdrekkasøluna*". [1]

Roknskaparhugtøkini, ið verða nýtt í § 45: "*landskassaroknskapurin" og "roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap*", samsvara ikki við tey hugtøk, sum verða nýtt í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m.", sum varð lýst 23. mars 1994, t.v.s. áðrenn verandi stýrisskipanarlóg varð samtykt. Sambært § 1 í Ll. nr. 33/1994 skal Landsstýrið leggja fyri Løgtingið tann "*samlaða landsroknskapin*", sum í uppsetingini skal fylgja fíggjar- og eykajáttanarlógum fyri árið og skal fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins.

## 3.2 Løgmaður tekur málið upp í 1998

Í september 1998 boðaði løgmaður frá, at hann hevði vent sær til Formansskap Løgtingsins um spurningin, hvørjir roknskapir talan var um í § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini, fyri at fáa hesi viðurskifti uppá pláss. Formansskapurin svaraði løgmanni í juli 1998, at tað var eitt umsitingarligt mál, sum formansskapurin einki hevði við at gera.

Løgmaður vendi sær til løgtingsgrannskoðararnar í skrivi 21. september 1998, og tá løgmaður 20. november 1998 fekk uppskot til løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum til ummælis, har nógv grundleggjandi ógreið viðurskifti vórðu umrødd í almennu viðmerkingunum, boðaði løgmaður á fundi 8. desember 1998 frá, at hann fór at taka stig til at seta ein arbeiðsbólk at gjøgnumganga viðurskiftini hjá stovnum og grunnum, sum ikki vóru við á fíggjarlóg/í landsroknskapinum, fyri at meta um:

- hvør eigur stovnin/grunnin, herímillum hvør eigur ognirnar, um stovnurin/ grunnurin verður tikin av,
- tilknýtið til fíggjarlógina, hvat skal við og á hvønn hátt,
- tilknýtið til landsroknskapin, landsbókhald og landsgjaldføri.

[1] Helst er tilvísingin til Rúsdrekkasøluna ein misskiljing, tí Rúsdrekkasølan hevur ongantíð havt sjálvstøðugan roknskap.

## 3.3 Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tekur málið upp í 1999

Í mai 1999 boðaði løgmaður frá, at hann í mars 1999 hevði heitt á landsstýrismannin í fíggjarmálum um at seta ein arbeiðsbólk at gera álit um framman fyri nevndu viðurskifti, og at hetta álit skuldi verða liðugt í 1999. Niðurstøðan í álitunum varð eisini avgerandi fyri, hvussu stovnarnir/grunnarnir skuldu verða fevndir av lógini um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

Í februar 2000 boðaði landsstýrismaðurin frá, at tað hevði ikki eydnast honum at manna ein arbeiðsbólk. Í samráð við løgmann hevði landsstýrismaðurin tí gjørt av at biðja fólk í umsitingini gera arbeiðið.

Í februar 2001 boðaði landsstýrismaðurin frá, at arbeiðið var ikki liðugt. Ein arbeiðs- og tíðarætlan varð gjørd, og skuldi arbeiðið verða liðugt fyri summarfrítíðina 2001. Teir grunnar/stovnar, ið áttu at standa á fíggjarlógini, skuldu verða settir á fíggjarlógina í 2002.

## 3.4 Álit frá Fíggjarmálaráðnum í november 2001

Í november 2001 var Fíggjarmálaráðið liðugt við arbeiðið og læt úr hondum álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðaraviðurskifti".

Álitið viðger eina røð av landsstovnum og –grunnum umframt aðrar sjálvsognarstovnar. Nakrir grunnar verða ikki viðgjørdir, antin tí at teir hava einki tilknýti til landskassan, ella tí at játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftini fylgja galdandi lógum. Aðrir grunnar verða tiknir við fyri at vísa skilnaðin millum landsgrunnar og privatar grunnar.

Niðurstøðan í álitinum er, at fleiri landsstovnar og –grunnar, í stríð við galdandi lóg, verða ikki tiknir við á fíggjarlóg og í landsroknskapin. Harafturat verða roknskapirnir hjá fleiri av hesum grunnum/stovnum ikki lagdir fyri Løgtingið, eisini í stríð við galdandi lóg. Álitið vísir á, hvussu trupulleikarnir kunnu verða loystir. Fyri flestu landsstovnar og –grunnar merkir tað, at alt virksemið verður at taka við á fíggjarlógina og í landsroknskapin.

Tó er møguligt í heilt serligum førum at hava virksemið uttan fyri fíggjarlógina, um heimildin at halda útreiðslur verður delegerað til almennan stovn ella grunn. Tílík delegatión kann bert verða givin við lóg. Í teimum førum skal roknskapurin tó altíð verða lagdur fyri Løgtingið sambært § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini.

Fíggjarmálaráðið vísti á, við atliti at niðurstøðunum í álitinum, at tað verður uppgávan hjá hvørjum aðalráði sær at finna eina loysn fyri teir landsstovnar og -grunnar, sum aðalráðini varða av.

Um heimild at áleggja og krevja inn skatt

Í álitinum vísir Fíggjarmálaráðið eisini á, at neyðugt er bæði at hava materiella heimild í løgtingslóg og fíggjarliga heimild í fíggjarlóg, áðrenn skattir kunnu verða kravdir inn. Her er talan um bindandi stjórnarrættarligar ásetingar, ið ikki loyva undantøkum – heimildin at áleggja ella broyta skatt kann ikki verða útdelegerað.

Um Arbeiðsloysisskipanina og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin

Viðvíkjandi Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Arbeiðsloysisskipanini, sum ikki eru við á fíggjarlógini, staðfestir Fíggjarmálaráðið, at inngjøldini í grunnarnar eru at rokna sum skattur. Fíggjarmálaráðið ger vart við, at:

- sambært § 41, stk. 1, í stýrisskipanarlógini kann eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur verða álagdur, broyttur ella tikin av uttan við løgtingslóg,
- sambært § 41, stk. 3, í stýrisskipanarlógini er ikki loyvt at krevja inn teir skattir, ið nevndir eru í § 41, stk. 1, áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á Løgtingi.

Sostatt skulu øll inngjøld til grunnarnar verða ásett við lóg og verða tikin við á fíggjarlógina.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at tá ið ALS-stýrið sambært § 9, stk. 3, í Ll. nr. 113/1997 v.s.b. "um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing" hevur heimild at broyta ALS-gjaldið[2], er talan um brot á § 41, stk. 1, í stýrisskipanarlógini, og tá ið inngjaldið ikki verður tikið við á fíggjarlógina, er talan um brot á § 41, stk. 3, í stýrisskipanarlógini.

Fíggjarmálaráðið ger eisini vart við, at eingin heimild er at halda útgjaldinum og útreiðslunum til umsiting av grunnunum uttan fyri fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Talan er um brot á § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini.

## 3.5 Samskifti við løgmann í 2002

Í uppskoti til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) vórðu niðurstøðurnar í álitinum frá Fíggjarmálaráðnum umrøddar, og Løgtingið samtykti 12. mars 2002 at heita á løgmann um at síggja til, at stýrisskipanarlógin í framtíðini fór at verða hildin, soleiðis:

*at* allir stovnar/grunnar, sum skulu við á fíggjarlógina, verða tiknir við í fíggjarlógina 2003,

*at* allir almennir roknskapir, sum sambært § 45, stk. 4, skulu verða lagdir fyri tingið, verða lagdir fyri tingið fyri 1. juli 2002, galdandi fyri roknskapir frá fíggjarárinum 2001.

Í skrivi 6. juni 2002 spurdi Landsgrannskoðanin løgmann, hvørji stig hann hevði tikið. Í svarskrivi sínum 13. juni 2002 vísti løgmaður á, at álitið frá Fíggjarmálaráðnum varð gjøgnumgingið og umrøtt á fundi 29. november 2001 millum løgmansstjóran og aðalstjórarnar. Harafturat varð álitið lagt fram og gjøgnumgingið á landsstýrisfundi 11. desember 2001. Á landsstýrisfundinum varð avrátt at gera neyðugar broytingar samsvarandi álitinum. Í einum yvirliti, sum var lagt við svarskrivi løgmans, vísti løgmaður á stovnar/grunnar, sum skuldu við á fíggjarlógina 2003.

Í skrivi til løgmann 15. november 2002 gjørdi Landsgrannskoðanin vart við, at eingir av hesum stovnum/-grunnum vóru við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003, og at heldur eingin lógarbroyting var samtykt, sum heimilaði, at virksemið hjá ávísum stovnum/grunnum varð hildið uttanfyri fíggjarlógina, vísandi til heilt serligar umstøður. Vit vístu á, at okkum kunnugt vórðu ikki allir roknskapir lagdir fyri tingið samsvarandi ásetingunum í stýrisskipanarlógini. Heitt varð á løgmann um at kunna seg neyvari um hesi viðurskifti.

Í desember 2002 svaraði løgmaður, at hann als ikki helt støðuna vera nøktandi. Tað var serliga harmiligt, tá ið Fíggjarmálaráðið sjálvt longu í november 2001 hevði gjørt vart við trupulleikan, og fyri at hetta álvarsmál ikki skuldi fara aftur við borðinum, hevði tað tí eisini verið fyri á landsstýrisfundi í desember 2001 og har varð gjørt av, at hvør landsstýrismaður beinanvegin skuldi gjøgnumganga landsstovnar á sínum øki, gera neyðugar broytingar samsvarandi álitinum og greiða møguligar

[2] Sambært nevndu grein kann Stýrið fyri ALS við kunngerð broyta tað í stk. 1 nevnda ALS-gjald, tó ongantíð til hægri enn 2,5% og ikki hægri enn 2,25% frá 1. januar 1998.

ivaspurningar í samráð við Fíggjarmálaráðið. Tá ið løgmaður í juni 2002 skrivliga hevði mint landsstýrismenn á málið, helt hann seg hava alla grund til at halda, at teir fóru at greiða viðurskiftini uttan drál.

Við skrivinum frá løgmanni í desember 2002 var eitt yvirlit yvir, hvussu arbeitt varð við at finna fram til, um landsstovnar/-grunnar skuldu við á fíggjarlógina, ella hava lógarheimild at liggja uttanfyri. Arbeiðsbólkar arbeiddu við heimildarspurningunum. Sambært Løgmálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum miðaðu arbeiðsbólkarnir ímóti at fáa viðurskiftini hjá summum grunnum endaliga avgreidd í tingsetuni. Viðurskiftini hjá øðrum grunnum skuldu eftir ætlan verða liðug at avgreiða á ólavsøku 2003. Løgmaður hevði tikið hesa arbeiðsætlan til eftirtektar. Tá ið hugsað varð um tey serliga truplu viðurskifti, tá ið talan var um grunnar, sum eisini arbeiðsmarknaðurin varðaði av, helt løgmaður seg hava tikið stig til at loysa hetta álvarsmál forsvarliga.

## 3.6 <u>Fundur millum løgmann og løgtingsgrannskoðararnir í 2003</u>

Málið varð eisini viðgjørt á fundi við løgtingsgrannskoðararnar 31. januar 2003, har løgmaður m.a. vísti á:

> *"at ymiskir arbeiðsbólkar arbeiða við at greiða heimildarspurningarnar. Sambært Løgmálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum verður miðað ímóti, at viðurskiftini viðv. nøkrum av grunnunum verða endaliga avgreidd í hesari tingsetuni. Aðrir arbeiðsbólkar verða ætlandi lidnir at greiða heimildarspurningarnar til ólavsøku 2003. Løgmaður helt, at tað var umráðandi, at arbeiðið ikki steðgaði upp, hóast løgtingsgrannskoðararnir valdu at bíða við at leggja uppskotini til samtyktar fyri tingið. Løgmaður helt, at í seinasta lagi 1. september 2003 mátti Landsstýrið taka endaliga støðu til ognarrætt og framtíðar tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap, soleiðis at neyðugar broytingar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 og aðrar lógarbroytingar kundu verða framdar fyri árslok 2003".*

Henda tíðarætlan helt ikki, og Landsgrannskoðanin heitti á Løgmansskrivstovuna um at greiða frá gongdini í málinum.

## 3.7 <u>Samskifti við løgmann 2004 - 2006</u>

Í januar 2004 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at miðfyrisitingin hevði arbeitt við málinum í 2003. Arbeiðið hevði verið skipað í samstarvi millum stjórnarráðini, har Løgmálaráðið og Fíggjarmálaráðið, hvør á sínum fakøki, hevði ráðgivið um møguligar loysnir. Uppskot til loysnir varð lagt fyri á landsstýrisfundi 17., 18. og 26. november 2003. Málið kom tó ikki víðari, av tí at val varð útskrivað 5. desember 2003.

Í desember 2004 kunnaði løgmaður um, at á fundi 30. november 2004, har bæði landsstýrismenn og aðalstjórar høvdu verið við, varð gjørt av, at Fíggjarmálaráðið skuldi taka stig til at gjøgnumganga og finna hóskandi loysnir fyri teir einstøku grunnarnar/stovnarnar saman við avvarðandi stjórnarráðum. Uppskot um loysnir skuldu síðani verða løgd fyri aftur á landsstýrisfundi, so at hvør landsstýrismaður kundi taka endaliga avgerð í sínum málum. Løgmaður fylgdi við gongdini til tess at tryggja, at komið varð á mál.

Spurdur, hvat síðani var hent í málinum, vísti løgmansstjórin í januar 2006 á, at spurningurin um tilknýtið hjá landsstovnum/grunnum til fíggjarlógina varð viðgjørdur í einum arbeiðsbólki, ið Løgtingið 1. mars 2005 hevði sett at gera álit og uppskot til lóg um játtanarreglur.

## 3.8 Uppskot til løgtingslóg "um landsins játtanarskipan" í 2006

Eftir uppskoti frá Fíggjarnevndini setti løgtingsformaðurin í mars 2005 eina serfrøðinganevnd at fyrireika uppskot til lóg, ið kundi loysa hesi ivamál og aðrar trupulleikar við verandi játtanarskipan.

24. februar 2006 læt arbeiðsbólkurin løgtingsformanninum álit. Arbeiðsbólkurin lýsti og viðgjørdi ivamál og trupulleikar við verandi játtanarskipan og vísti á, hvussu trupulleikarnir kundu verða loystir við einari játtanarlóg. Í álitinum stendur m.a.:

> *"Skal alment virksemi verða sett í verk uttan fyri fíggjarlógina, krevst útreiðslujáttan á fíggjarlógini í tann mun, almenn virði verða sett í. Harafturat krevst materiell lógarheimild í tann mun myndugleiki verður latin nevndum, stýrum ella ráðum at útinna endaligar fyristingaravgerðir (§ 35. í stýrisskipanarlógini), ella yvirhøvur, um rættindi og skyldur verða flutt. Verður t.d. loyvi givið til lógarheimilaðan einkarætt, krevur tað eina materiella lógarheimild.*
>
> *Eitt nú við atliti til skyldur er sjálvsagt og í mongum førum neyðugt at seta krøv um, at almennir lønarsáttmálar, leigureglur, kappingarreglur, búskaparpolitikkur o.a.. skulu haldast og somuleiðis játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglur. Í sambandi við stovnan skal støða eisini verða tikin til, um innlits-, og fyrisitingarlógin og útboðsreglurnar hjá tí almenna skulu vera galdandi, og virksemið skal koma undir sjálvtryggingarskipanina hjá landinum ella grannskoðanina hjá Landsgrannskoðanini. Arbeiðsbólkurin mælir til, at í játtanarlógini verður ásett hvørjir stovnar, grunnar o.a., ið verða tikin við á fíggjarlógina, men at vikið kann verða frá tí við lóg. Í slíkari lóg eigur støða eisini at verða tikin til, í hvussu stóran mun reglusettið, nevnt omanfyri, skal galda.*
>
> *Tað almenna eigur ikki at átaka sær ábyrgd yvirhøvur fyri virksemi uttan fyri fíggjarlógina, sum ein landsstýrismaður ikki hevur rætt at geva tænastuboð um ella hevur eftirlitsskyldu við. Skal alment virksemi fara fram uttan fyri fíggjarlógina, má løgtingið samstundis tryggja sær, at tað almenna ikki svarar fyri ella kann ábyrgjast í sambandi við slíkt virksemi, uttan so at viðkomandi landsstýrismaður eisini kann ábyrgjast. Sostatt eigur støða m.a. at verða tikin til, um viðkomandi stovnur kann fara í gjaldssteðg og/ella gjaldtrot. Í sambandi við at alment virksemi verður sett í verk uttan fyri fíggjarlógina, eigur støða eisini at verða tikin til eigaraviðurskiftini. Skal tað almenna nær sum helst kunna flyta møgulig virði aftur í landskassan, eiga allir áhugaðir partar at verða kunnaðir um tað frammanundan."*

## 3.9 Nýskapandi lógargreinir í lógaruppskotinum

3. mars 2006 legði løgtingsformaðurin fram uppskot til løgtingslóg "um landsins játtanarskipan" (Lm. nr. 81/2005).

Í lógaruppskotinum vóru fleiri broytingar í mun til verandi játtanarskipan, og niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin víst á nakrar nýskapandi lógargreinir:

### Brot úr kapittul 1: Játtanarlógir og aðalreglur um játtan

**§ 4.** Allur beinleiðis og óbeinleiðis skattur, sum kravdur verður inn við heimild í lóg, verður førdur á fíggjarlógina.
*Stk. 2.* Beinleiðis og óbeinleiðis skattur fevnir um øll kravd gjøld, uttan beinleiðis mótveiting.

**§ 5.** Við á fíggjarlógina verða tiknir stovnar og grunnar o.t., hvørs útreiðslur ella roknskaparligu hall verða goldin við studningi frá landinum ella við gjøldum ella aðrari inntøku sambært lóg, ella sum eru ella partvís eru stovnaðir við kapitalinnskoti frá landinum.
*Stk. 2.* Stk. 1 verður tó ikki nýtt, um reglur eru í aðrari lóg, sum víkja frá hesum.

### Brot úr kapittul 2: Játtanararbeiðið og játtanareftirlit

**§ 8.** Fyri 1. apríl leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fram uppskot til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar.

*Stk. 2.* Ein frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran (land og kommunur), verður løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt.
*Stk. 3.* Hvør landsstýrismaður skal innan fyri tillutaða játtanarkarmin gera sín part av fíggjarlógaruppskotinum.

**§ 9.** Samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fram frágreiðing (Búskaparfrágreiðing II), sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum.

## Brot úr kapittul 3: Uppseting og innihald í fíggjarlógaruppskotinum

**§ 12.** Við átekning kann heimild verða givin at gera avtalur, sum hava við sær útreiðslur í fylgjandi fíggjarárum, og gjørdar kunnu verða ítøkiligar lógarásetingar viðvíkjandi játtanum.
*Stk. 2.* Átekningar kunnu bara verða tiknar við á fíggjarlóg ella eykajáttan smbr. § 2, stk. 1, nr. 1. og 2, og hava bara gildi í sama fíggjarári.

## Brot úr kapittul 4: Játtanarsløg

**§ 14.** Játtanirnar á fíggjarlógini kunnu liðast í hesi játtanarsløg, sum serligar ræðisreglur galda fyri:

1. Rakstrarjáttan
2. Løgujáttan
3. Lógarbundin játtan
4. Stuðulsjáttan

*Stk. 2.* Játtanarslagið skal síggjast á høvuðskontuni.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tekur støðu í ivaspurningum um játtanarsløg.

**§ 22.** Løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í § 13 kann tað við átekning verða givin heimild at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár.
*Stk. 3.* Í viðmerkingunum til løgujáttanir skal verða ein frágreiðing um tað ávísa løguarbeiðið og upplýsingar um útreiðslurnar fyri alla verkætlanina liðaðar á fíggjarár.
*Stk. 4.* Viðmerkingar til inntøkujáttanir skulu lýsa grundarlagið undir inntøkumetingum.

**§ 24.** Stuðulsjáttan verður nýtt til stuðul, sum ikki er lógarbundin, til lán og til útreiðslur fyri veðhøld.
*Stk. 2.* Verður stuðul, lán og innloyst veðhøld afturrindað, verða tey tikin við undir stuðulsjáttan.
*Stk. 3.* Sama um gjald heilt ella fyri ein part verður goldið í einum seinni fíggjarári, so verða tilsagnir um stuðul og lán útreiðsluførdar í tí fíggjarári, tá ið bindandi tilsøgn er givin. Tilsagnarupphæddir, ið ikki eru útgoldnar við ársenda, verða fluttar til fíggjarstøðuna, har tær standa støðlaðar, til tilsøgnin endaliga verður avgreidd.
*Stk. 4.* Viðmerkingar til stuðulsjáttanir skulu lýsa neyvt endamál, móttakaraskara, útrokningarhátt, samantalda studningsupphædd og útgjaldingartíð.

## Brot úr kapittul 5: Stuðulsfyrisiting

**§ 25.** Til tess at tryggja skynsama stuðulsfyrisiting skulu reglur vera ásettar um:

1. Endamálið við stuðlinum
2. Móttakaraskara og útrokningargrundarlag
3. Útgjaldshátt og útgjaldstíð
4. Málsviðgerð
5. Viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar
6. Eftirlit
7. Fíggjarætlan, roknskap og grannskoðan
8. At geva ella taka aftur tilsøgn og at afturrinda stuðul
9. Upplýsingarskyldu og atgongd til kanning á staðnum og kanning av roknskapartilfari
10. Møguliga sekt við bót fyri at bróta reglurnar

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetur reglur, sum víst í stk. 1.

*Stk. 3.* Í tann mun slíkar reglur ikki longu eru ásettar í ella sambært lóg, verða reglurnar, ásettar eftir stk. 2, nýttar.

Brot úr kapittul 6: Aðrar ásetingar

**§ 26.** Tað liggur á landsstýrismanninum í fíggjarmálum at síggja til, at hvør einstakur landsstýrismaður altíð heldur ásetingarnar í hesari lóg og reglur, gjørdar sambært lógini.

**§ 27.** Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fær heimild at áseta neyvari reglur um:

1. Uppseting og innihald í uppskoti til fíggjarlóg
2. Rakstrarjáttan, herímillum hvørjar inntøkur og utreiðslur, ið kunnu verða tiknar við
3. Fíggjarligan rakstur av inntøkufíggjaðum virksemi
4. Fíggjarligan rakstur av stuðulsfíggjaðum virksemi, og meginreglur fyri, nær hesar inntøkur verða skrásettar
5. Løgujáttan
6. Lógarbundna játtan
7. Stuðulsjáttan
8. Avmarkingar í flytingum millum standardkontur

## 3.10 Lógaruppskotið fall burtur

Lógaruppskotið varð 15. mars 2006 beint í serliga § 25 nevnd.

Sambært § 4, stk. 1, í lógaruppskotinum "*verður allur beinleiðis og óbeinleiðis skattur, sum kravdur verður inn við heimild í lóg, førdur á fíggjarlógina.*"

Sambært § 4, stk. 2, í lógaruppskotinum "*fevnir beinleiðis og óbeinleiðis skattur um øll kravd gjøld, uttan beinleiðis mótveiting.*"

Eftir 1. viðgerðina í Løgtinginum at døma tyktist tvídráttur vera ímillum tinglimir um skattaallýsingina við atliti at Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Arbeiðsloysisskipanini. Sum Landsgrannskoðanin skilir, kann tað vera ein orsøk til, at lógaruppskotið kom ikki aftur úr nevnd, áðrenn tingið fór heim í mai 2006, og fall tí burtur.

## 3.11 Tilmæli til løgtingsformannin í 2006

Í september 2006 vísti løgmaður á, at málið um at seta í gildi nýggja lóg um játtanarreglur liggur í Løgtinginum, og tað má tí ganga sína gongd, áðrenn onnur stig verða tikin av Landsstýrinum.

Í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2006 helt Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at málið ikki verður slept, og mælti løgtingsformanninum til at reisa tingmálið "um landsins játtanarskipan" av nýggjum skjótast til ber.

## 3.12 Tilmæli til løgmann og landsstýrismanninum í fíggjarmálum í 2007

Í mars 2007 mæltu vit løgmanni og landsstýrismanninum til:

- at ávísar broytingar verða gjørda í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum 2006,
- at taka støðu til, um virksemi og/ella fyrisitingarútreiðslur hjá ávísum stovnum og grunnum skulu við á fíggjarlógina,
- at samskipa lógarásetingarnar um roknskap og grannskoðan.

Løgmaður svaraði ongantíð. Landsstýrismaðurin svaraði í juni 2007, at Fíggjarmálaráðið fer, saman við Gjaldstovuni, at viðgera tilmæltu broytingarnar í landsroknskapinum 2007.

# 4 Tilmæli um broytingar í landsroknskapinum 2006

Sum nevnt, er ikki full semja um lógaruppskotið “um landsins játtanarskipan”. Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava mælt til fleiri broytingar/-ábøtur, ið ikki eru tengdar at lógaruppskotinum.

Niðanfyri verður víst á nøkur øki, har broytingar kundu verið framdar í landsroknskapinum 2006.

## 4.1 Fíggjarstøðan, “kapitalinnskot”

Fíggingargrunnurin frá 1992 er við sum aktiv á fíggjarstøðuni í landsroknskapinum undir roknskaparpostinum “kapitalinnskot”. Fíggingargrunnurin er tikin við í landsroknskapinum við “innara virði”, sum svarar til alla eginognina, eftirsum landið einsamalt eigur grunnin.

Eingin allýsing finst av hugtakinum “kapitalinnskot”, og at bert hesin grunnur er eftir í roknskaparpostinum, er helst ein søgulig tilvild. Í nógv ár hevur Løgtingið í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum sum “kapitalinnskot”.

Vísandi til **fylgiskjal 1** er talan um 11 stovnar/grunnar, sum tilsamans hava eina eginogn um 2,3 mia.kr. Teir størstu av hesum grunnum eru:

| | mió.kr. |
|---|---|
| • Føroya Realkreditstovnur | 615 |
| • Arbeiðsloysisskipanin | 547 |
| • Húsalánsgrunnurin | 461 |
| • Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin | 440 |
| • Landsbankin, netto | 139 |
| • Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin | 63 |
| • Frítíðargrunnurin | 15 |
| • Íbúðagrunnurin | 12 |
| | 2.292 |

Fíggjarmálaráðið kunnaði í oktober 2005 um, at ætlanin var at taka málið upp, og at miðað varð fram ímóti at taka allar grunnar o.l. við sum ogn í landsroknskapinum 2005, men tað varð ikki gjørt. Landsgrannskoðanin mælti til at taka henda spurning uppaftur í sambandi við landsroknskapin 2006. Sambært landsstýrismanninum verður tað gjørt í landsroknskapinum 2007.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at um landsstýrismaðurin heldur iva vera um, hvørt landið eigur ein stovn/grunn, ber til at taka fyrivarni fyri tí í landsroknskapinum.

## 4.2 Fíggjarstøðan, virðisbrøv (partabrøv)

Partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við sum aktiv á fíggjarstøðuni í landsroknskapinum undir “virðisbrøv”. Í landsroknskapinum 2006 eru partabrøv skrásett til tilsamans 551 mió.kr. Sjá **fylgiskjal 2**. Partabrøvini er skrásett við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, til yvirkurs og til útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum.

Niðanfyri er eitt yvirlit, ið vísir innara virðið sambært ársroknskapinum hjá 10 av teimum 16 feløgunum:

1.000 kr.

| 2006 | Keypsvirðið | Innara virðið |
|---|---|---|
| P/f Atlantic Airways | 127.000 | 195.868 |
| P/f Fiskaaling | 4.635 | 5.792 |
| P/f Føroya Dátusavn | 200 | 248 |
| P/f Føroya Lívstrygging | 500 | 90.505 |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 327.148 |
| Nordatlantisk Turistselskab Aps. | 66 | -98 |
| P/f Norðoyatunnilin | 127.500 | 121.353 |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 48.564 |
| P/f Smyril Line | 2.760 | 3.488 |
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 161.102 |
| **Partabrøv, tilsamans** | **543.909** | **953.970** |

Av yvirlitinum sæst, at partabrøvini eru skrásett í landsroknskapinum við keypsvirðinum, 544 mió.kr. Innara virðið á hesum 10 feløgunum er tilsamans um 954 mió.kr.

Í sambandi við ætlaðu einskiljingarnar av almennum fyritøkum hevur Landsgrannskoðanin mælt til at endurskoða verandi roknskaparreglur og at umhugsa at fara yvir til at nýta innara virðið.

Í oktober 2005 kunnaði Fíggjarmálaráðið um, at ætlanin var at nýta innara virðið í landsroknskapinum 2005, men tað varð ikki gjørt.

Landsgrannskoðanin mælti til at taka henda spurning uppaftur í sambandi við landsroknskapin 2006. Sambært landsstýrismanninum verður tað gjørt í sambandi við landsroknskapin 2007.

## 4.3 Fíggjarstøðan, "eksternir grunnar"

Vísandi til **fylgiskjal 3** eru 8 grunnar, ið bera heitið "eksternir grunnar". Av teimum eigur landið helst bara teir 7. Tilsamans hava teir eina eginogn 336 mió.kr.:

| | mió.kr. |
|---|---|
| • Búnaðargrunnurin | 252 |
| • Vinnuframagrunnurin | 44 |
| • Forskotsgrunnur fiskiflotans | 27 |
| • Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar | 7 |
| • Mentanargrunnur landsins | 5 |
| • Grunnur ætlaður brekaðum | 1 |
| • Granskingargrunnurin | 0 |
| | 336 |

Roknskapirnir hjá hesum stovnum eru einsæris við sum fylgiskjøl aftast í landsroknskapinum. Eginognin hjá grunnunum verður ikki tald við í samlaðu fíggjarstøðuna, sum víst á s. 6-7 í landsroknskapinum 2006.

Landsgrannskoðanin heldur, at landsroknskapurin hevði víst eina rættari mynd av fíggjarstøðuni, um hesir grunnar eisini vórðu tiknir við. Grunnarnir kundu verið greinaðir í einari notu, við tilvísing til verandi fylgiskjal um eksternar grunnar. Landsgrannskoðanin hevur mælt til at taka eksternar grunnar við sum serstakan post á fíggjarstøðuni í landsroknskapinum 2006, men tað varð ikki gjørt.

Sambært álitinum frá november 2001 frá Fíggjarmálaráðnum er Grunnurin Kirkjubømúrurin ein veruligur grunnur, ið eigur seg sjálvan. Grunnurin skal sambært álitinum ikki við á fíggjarlógina og skal ikki roknast sum eksternur grunnur í landsroknskapinum. Landsgrannskoðanin hevur tí mælt til at flyta roknskapin hjá grunninum undir “Roknskapir, legat o.t.” í landsroknskapinum 2006. Sambært landsstýrismanninum verður tað gjørt i sambandi við landsroknskapin 2007.

# 5 Støðutakan til aðrar broytingar

Sum víst á í innganginum, eru ivamálini um tilknýtið hjá landsstovnum og grunnum til fíggjarlóg og landsroknskap umrødd í áravís. Niðanfyri hava vit roynt meira ítøkiliga at vísa á, hvørjar stovnar talan er um, og hvat ivamálini snúgva seg um.

## 5.1 Stovnar/grunnar

### *5.1.1 Virksemi*

Virksemið, tað veri útláns-, stuðuls- ella annað virksemi, hjá 11 landsstovnum/grunnum er ikki við á fíggjarlógini og í landsroknskapinum.

Vísandi til **fylgiskjal 4** er í 2006 talan um 266 mió.kr. í skatti og avgjøldum, um 141 mió.kr. í rentuinntøkum o.t., um 48 mió.kr. í rentuútreiðslum og um 169 mió.kr., ið er tilskot til einstaklingar.

Fíggjarmálaráðið hevur víst á, at í heilt serligum førum er tað møguligt at hava virksemið uttan fyri fíggjarlógina, um Løgtingið delegerar heimildina til almennan stovn ella grunn. Tó kann heimildin at áleggja ella broyta skatt ikki verða delegerað. Í mars 2007 mælti Landsgrannskoðanin løgmanni og landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at viðgera spurningin.

Løgmaður svaraði ongantíð. Landsstýrismaðurin svaraði í juni 2007, at Fíggjarmálaráðið fór, saman við Gjaldstovuni, at viðgera tilmæltu broytingarnar í landsroknskapinum 2007.

### *5.1.2 Fyrisitingarútreiðslur*

Fyrisitingarútreiðslur hjá aðalráðum og stovnum verða játtaðar á fíggjarlógini á serstakari játtan. Sambært játtanarskipanini skal í viðmerkingunum til fíggjarlógina vera:

- frágreiðing um endamálið við játtanini,
- ein sundurgreinað ætlan,
- eitt virksemisyvirlit, og
- eitt starvsfólkayvirlit.

Í flestu førum eru stovnarnir bundnir av einum lønarkarmi. Á henda hátt er tað Løgtingið, sum í síðsta enda ger av, hvussu stórar fyrisitingarútreiðslur stovnarnir skulu hava.

Fyrisitingarútreiðslur hjá 11 landsstovnum/grunnum eru ikki við á fíggjarlógini. Vísandi til **fylgiskjal 4** er talan um 17 mió.kr. í lønum og um 13 mió.kr. í øðrum fyrisitingarútreiðslum í 2006.

Vísandi til **fylgiskjal 6** er einki ásett um fyrisitingarútreiðslur á fíggjarlógini.

Fyrisitingarútreiðslurnar at reka Landsbankan, Húsalánsgrunnin og Føroya Realkredittstovn verða fíggjaðar við einum rentumarginali, og hesir stovnar hava tí í veruleikanum "óavmarkaðar" møguleikar at økja fyrisitingarútreiðslurnar uttan fyri ræði Løgtingsins.

Sama ger seg galdandi fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Arbeiðsloysisskipanina, sum krevja gjøld (skatt) frá lønmóttakarum og arbeiðsgevarum, og brúka ein part av hesum gjaldi til at rinda fyrisitingarútreiðslur.

Landsgranskoðanin heldur, at Landsstýrið eigur at seta sær spurningin, hví fyrisitingarútreiðslur hjá Føroya Realkreditstovni, Húsaláns-, Bjálvingarstuðulsláns-, Íbúðaog Búnaðargrunninum, Landsbanka Føroya, Vinnuframagrunninum, Arbeiðsloysisskipanini o.ø. ikki verða játtaðar á fíggjarlógini. Er tað tilvitað ella av tilvild?

Umframt spurningin, um tað er “lógligt”, at hesar útreiðslur liggja uttan fyri fíggjarlógina, heldur Landsgrannskoðanin tað eisini vera ein spurning, um tað er skilagott og ynskiligt, at júst hesar fyrisitingarútreiðslur liggja uttan fyri ræði Løgtingsins. T.d. hava allir aðrir stovnar serstaka játtan á fíggjarlógini til fyrisiting:

- Stuðulsstovnurin til at fyrisita eina lóg um stuðul og lán til lesandi.
- Almannastovan og Hjálpartólamiðstøðin til at fyrisita stuðul og lán.
- Toll- og Skattstova Føroya til at fyrisita lógir um skatt og avgjøld og ymiskar stuðulsveitingar o.s.fr.

Í mars 2007 mælti Landsgrannskoðanin løgmanni og landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at viðgera spurningin.

Løgmaður svaraði ongantíð. Landsstýrismaðurin svaraði í juni 2007, at Fíggjarmálaráðið fór, saman við Gjaldstovuni, at viðgera tilmæltu broytingarnar í landsroknskapinum 2007.

### *5.1.3 Roknskapar- og grannskoðaraviðurskifti*

Vísandi til **fylgiskjal 6** eru sera ymiskar ásetingar og orðingar um:

- roknskaparviðurskifti.
- grannskoðaraviðurskifti.

Vit hava mælt til at endurskoða og samskipa lógarásetingarnar.

## 5.2 <u>Eksternir grunnar</u>

### *5.2.1 Virksemi*

Hugtakið “eksternur grunnur” er ikki lógarfest og gjøllari greinað. Sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið “um avtøku av landskassagrunnum” (Ll. nr. 94/1997) hevur ein eksternur grunnur hesi eyðkenni:

- Grunnurin er ikki tikin við í fíggjarstøðu landskassans og hevur sjálvstøðugan roknskap.
- Grunnurin hevur stýri og umsiting.

Vísandi til **fylgiskjal 5** eru um 12 mió.kr. í rakstrar- og rentuinntøkum ikki við á fíggjarlógini/landsroknskapinum, og sama er við útreiðslunum til virksemið hjá grunnunum. Vinnuframagrunnurin, Mentanargrunnurin og Granskingargrunnurin høvdu í 2006 játtan á fíggjarlógini til stuðuls- ella annað virksemi. Talan er um 14 mió.kr.

Vit hava mælt til at endurskoða og allýsa hugtakið “eksternir grunnar”.

### *5.2.2 Fyrisitingarútreiðslur*

Vísandi til **fylgiskjal 7** er í flestu førum einki ásett um fyrisitingarútreiðslur á fíggjarlógini.

Bert fyrisitingarútreiðslurnar hjá Mentanargrunninum og Granskingargrunninum (Granskingarráðnum) verða játtaðar á fíggjarlógini á sama hátt sum hjá aðalráðunum og stovnum.

Landsgrannskoðanin heldur, at Landsstýrið eigur at seta sær spurningin, hví fyrisitingarútreiðslur hjá Føroya Realkreditstovni, Húsaláns-, Bjálvingarstuðulsláns-, Íbúða- og Búnaðargrunninum, Landsbanka Føroya, Vinnuframagrunninum, Arbeiðs-

loysisskipanini o.ø. ikki verða játtaðar á fíggjarlógini. Er tað tilvitað ella av tilvild? Vit hava mælt til at viðgera spurningin

Búnaðargrunnurin

Sambært § 13 í Ll. nr. 21/2004 "um Búnaðargrunnin" skulu inntøkur og útreiðslur ikki takast við í løgtingsfíggjarlóg. Vit hava mælt til at endurskoða lógarásetingarnar.

Vinnuframagrunnurin

Sambært § 2 í Ll. nr. 81/2001 "um Vinnuframagrunnin" verður fíggjarætlan grunsins tikin við á Løgtingsins fíggjarlóg. Sambært viðmerkingunum til § 2 í lógaruppskotinum "*boðar landsstýrismaðurin við hesari fíggjarætlan Løgtinginum frá, hvørja upphædd, grunnurin ætlandi fær at ráða yvir, hvønn stuðul, Løgtingið verður biðið um at veita grunninum, og hvørji vinnuøki, ið serliga skulu stuðlast úr grunninum.*"

Sambært § 11 í K. nr. 149/2001 "um umsiting og virksemi hjá Vinnuframagrunninum" "*verða rakstrarútreiðslur og rakstrarinntøkur hjá grunninum ikki tiknar við í fíggjarløgtingslógina*".

Ósamsvar tykist at verða millum ásetingarnar í løgtingslógini og í kunngerðini. Vit hava mælt til at endurskoða ásetingarnar í lógini og í kunngerðini.

Forskotsgrunnur fiskiflotans

Sambært § 4 í Ll. nr. 71/1997 "um Forskotsgrunn fiskiflotans" "*fyrisitur Lønjavningarstovan dagliga virksemi grunsins. Útreiðslurnar av fyrisitingini verða goldnar av grunninum*". Vit hava mælt til at endurskoða lógarásetingarnar.

### *5.2.3 Roknskapar- og grannskoðaraviðurskifti*

Vísandi til **Fylgiskjal 7** eru sera ymiskar ásetingar og orðingar um:

- roknskaparviðurskifti.
- grannskoðaraviðurskifti.

Vit hava mælt til at endurskoða og samskipa lógarásetingarnar.

## 5.3 Internir grunnar, avtøka

Vísandi til umrøðuna av internum grunnum í hesum notatinum eru bert 2 grunnar eftir:

- Apoteksgrunnurin
- Grunnur, umvælingarstudningur til friðað hús

Vit hava mælt til at taka av seinastu internu grunnarnar.

# 6 Stovnar/grunnar uttan fyri fíggjarlógina og landsroknskapin

Í talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir 11 grunnar/stovnar, sum sambært álitinum frá Fíggjarmálaráðnum eru ogn landsins:

| *Landsgrunnar/ -stovnar* | **Við á fíggjarlógini 2006** | | | **Við í landsroknskapinum 2006** | | **Grannskoðan sambært § 45 í stýrisskipanar -lógini** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Virksemi** | **Fyrisitingar -útreiðslur** | **Stuðuls-játtan** | **Partur av fíggjar-støðuni** | **Við sum fylgi-skjal** | |
| Húsalánsgrunnurin | nei | nei | nei | nei | nei | **ja** |
| Bjálvingarstuðulsláns-grunnurin | nei | nei | nei | nei | nei | **ja** |
| Íbúðagrunnurin | nei | nei | nei | nei | nei | **ja** |
| Arbeiðsloysisskipanin | nei | nei | nei | nei | nei | nei |
| Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnurin | nei | nei | nei | nei | nei | nei |
| Føroya Realkreditstovnur | nei | nei | nei | nei | nei | nei |
| Landsbankin | nei | nei | nei | nei | nei | nei |
| Frítíðargrunnurin | nei | nei | nei | nei | nei | nei |
| Sjálvsognarstovnurin “Sambýlir” | nei | nei | nei | nei | nei | nei |
| Sjálvsognarstovnurin á Mýrini/Grønlandsv. | nei | nei | nei | nei | nei | nei |
| Fróðskaparsetur Føroya sjálveigandi stovnur | nei | nei | nei | nei | nei | nei |

## 6.1 Virksemi ikki við á fíggjarlógini

Virksemið, tað veri útláns-, stuðuls- ella annað virksemi hjá hesum landsstovnum/-grunnum, er ikki við á fíggjarlógini.

Vísandi til **fylgiskjal 4** “Landsstovnar/grunnar, virksemi og fyrisitingarútreiðslur” er talan um 266 mió.kr. í skatti og avgjøldum, um 141 mió.kr. í rentuinntøkum o.t., um 48 mió.kr. í rentuútreiðslum og um 169 mió.kr., ið er tilskot til einstaklingar.

## 6.2 Fyrisitingarútreiðslur ikki við á fíggjarlógini

Fyrisitingarútreiðslur hjá hesum landsstovnum/grunnum er ikki við á fíggjarlógini. Vísandi til **fylgiskjal 4** er talan um 17 mió.kr. í lønum og um 13 mió.kr. í øðrum fyrisitingarútreiðslum.

Fyrisitingarútreiðslurnar av at reka Landsbankan, Húsalánsgrunnin og Føroya Realkredittstovn verða fíggjaðar við einum rentumarginali, og hesir stovnar hava tí í veruleikanum “óavmarkaðar” møguleikar at økja fyrisitingarútreiðslurnar uttan fyri ræði Løgtingsins.

Sama ger seg galdandi fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Arbeiðsloysisskipanina, sum krevja gjøld (skatt) frá lønmóttakarum og arbeiðsgevarum, og brúka ein part av hesum gjaldi til at rinda fyrisitingarútreiðslurnar.

Um at halda fyrisitingarútreiðslur uttan fyri fíggjarlógina verður í álitinum frá november 2001 frá Fíggjarmálaráðnum m.a. ført fram:

*"Landskassans útreiðslur í serstøkum førum kunnu verða hildnar uttan at verða tiknar við í fíggjarlóg, um heimildin er delegerað við lóg. Tað er eitt stjórnarrættarligt krav, at delegatión bert kann veitast við lóg. Henda heimild eigur at vera greið, soleiðis at ivi ikki stendst um delegatiónina, og hvat hon fevnir um…*

*Um fíggjarheimild skal delegerast, er avgerandi, at løgtingið hevur eitt veruligt eftirlit við tí virksemi, ið delegerað verður. Fyri at eftirlitið hjá tinginum skal verða veruligt, er avgerandi, at roknskaparviðurskiftini og grannskoðanarviðurskiftini lúka tey krøv, sum annars verða sett til landsstovnar. At ein týðandi partur av landsins virksemi liggur uttan fyri beinleiðis politiska ávirkan krevur harumframt, at viðurskiftini á hesum øki verða gjørd so greið sum gjørligt. Í lógini eigur klárt at verða ásett,*

- *at útreiðslur hjá grunninum ikki skulu takast við í fíggjar- ella játtanarlóg,*
- *at inntøkur ikki skulu takast við í fíggjarlóg (bert tá talan ikki er um skatt),*
- *at talan er um landsgrunn, sum er óheftur av beinleiðis ávirkan frá landsstýrinum,*
- *at hvørjar avleiðingarnar verða, um delegatiónin verður tikin aftur, serstakliga viðvíkjandi ognini."*

## 6.3 Stovnar/grunnar ikki við í landsroknskapinum

Sum sæst á talvuni, er eingin av hesum stovnum/grunnum við í landsroknskapinum.

## 6.4 Bert tríggir stovnar/grunnar grannskoðaðir sambært § 45 í stýrisskipanarlógini

Sum eisini sæst á talvuni, verða bert roknskapirnir hjá Húslánsgrunninum, Íbúðagrunninum og Bjálvingarstuðulslánsgrunninum lagdir fyri Løgtingið til góðkenningar sambært § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini. Eftir hesari greinini skulu roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap, verða lagdir fyri Løgtingið til samtyktar á sama hátt sum landsroknskapurin.

# 7 Eksternir grunnar

## 7.1 <u>Søgulig gongd</u>

Við Ll. nr. 33/1992 "um avtøku av landskassagrunnum" vórðu 71 landskassagrunnar tiknir av, og 9 grunnar vórðu umskipaðir til sokallaðar eksternar grunnar:

- Mentanargrunnurin.
- Gistingarhúsgrunnurin (Grunnur ferðavinnunnar)
- Grunnurin Kirkjubømúrurin.
- Grunnurin føroysk-donsk orðabók.
- Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál.
- Grunnurin jarðabøkur og aðrar søguligar keldur.
- Grunnur ætlaður brekaðum.
- Grunnur til menningarhjálp.
- Trygdargrunnur alivinnunnar.

Í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a.:

> *"Orsøkin til, at hesir grunnar halda fram sum eksternir grunnar, er, at talan er um endamál, har komið verður fram til eina loysn eftir fleri árum. Í øðrum førum má sigast, at ætlanin ikki hevur verið, at Landsstýrið einsamalt skal hava ræði yvir fæi grunsins, og tí verður hildið, at rættast er at gera grunnin til eksternan grunn."*

Við Ll. nr. 94/1997 "um avtøku av landskassagrunnum" vórðu 4 av teimum eksternu grunnunum tiknir av:

- Grunnurin føroysk-donsk orðabók.
- Grunnurin jarðabøkur og aðrar søguligar keldur.
- Grunnur til menningarhjálp.
- Trygdargrunnur alivinnunnar.

Grunnar, ið ikki vórðu tiknir av:

- Grunnurin Kirkjubømúrurin.[3]
- Mentanargrunnurin.
- Grunnur ætlaður brekaðum.
- Gistingarhúsgrunnurin (Grunnur ferðavinnunnar).
- Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál.

Sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið hevur ein eksternur grunnur hesi eyðkenni:

- Grunnurin er ikki tikin við í fíggjarstøðu landskassans og hevur sjálvstøðugan roknskap
- Grunnurin hevur stýri og umsiting

Ført verður eisini fram, at:

> *"Um peningur skal gjaldast úr internu grunnunum, so skal í flestu førum veitast játtan beinleiðis yvir fíggjarlógina. Útgjaldingar úr eksternu grunnunum <u>kunnu</u> fara fram uttan*

[3] Sambært álitinum frá november 2001 frá Fíggjarmálaráðnum er talan um ein veruligan grunn, ið eigur seg sjálvan. Grunnurin skal sambært álitinum ikki við í fíggjarlóg, og skal ikki við sum eksternur grunnur í landsroknskapin.

*játtan á fíggjarlógini, um so er, at grunnarnir eiga innistandandi pening. T.v.s., at sjálvt um internu grunnarnir ikki eru tiknir av, so kann Landsstýrið ikki játta pening til endamálið, um ikki játtan eisini er til tað á fíggjarlógini."*

## 7.2 Eksternir grunnar 2005

Í talvuni niðanfyri er eitt yvirlit yvir teir grunnar, sum sambært landsroknskapinum 2005 bera heitið "Eksternir grunnar":

| ***Eksternir grunnar*** | **Við á fíggjarlógini 2006** | | | **Við í landsroknskapinum 2006** | | **Grannskoðan sambært § 45 í stýrisskipanar-lógina** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Virksemi** | **Fyri-sitingar-útreiðslur** | **Stuðuls-játtan** | **Partur av fíggjar-støðuni** | **Við sum fylgiskjal** | |
| Vinnuframagrunnurin | nei | nei | ja | nei | ja | ja |
| Mentanargrunnur landsins | nei | ja | ja | nei | ja | ja |
| Granskingargrunnurin | nei | ja | ja | nei | ja | ja |
| Grunnur ætlaður brekaðum | nei | nei | nei | nei | ja | ja |
| Búnaðargrunnurin | nei | nei | nei | nei | ja | ja |
| Forskotsgrunnur fiskiflotans | nei | nei | nei | nei | ja | ja |
| Endurgjaldsgrunnur alivinnunar[4] | nei | nei | nei | nei | ja | ja |
| Grunnurin Kirkjubømúrurin[5] | nei | nei | nei | nei | ja | ja |

Á talvuni sæst, at av teimum grunnum, sum vórðu umskipaðir til eksternar grunnar í sambandi við Ll. nr. 33/1992 og Ll. nr. 94/1997 eru bert 3 eftir:

- Grunnurin Kirkjubømúrurin.
- Mentanargrunnurin.
- Grunnur ætlaður brekaðum.

Vinnuframagrunnurin varð sambært § 2 í Ll. nr. 81/2001 "um Vinnuframagrunn" skipaður sum eksternur grunnur frá 1. januar 2001. Samstundis vórðu Gistingarhús-grunnurin (Grunnur ferðavinnunnar) og Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál tiknir av.

Vísandi til yvirlitið niðanfyri eru hesir grunnar síðani í landsroknskapinum flokkaðir sum eksternir grunnar, uttan at tað er ásett í nakrari lóg:

| Navn | Lógargrundarlag |
|---|---|
| Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar | Ll. nr. 87/1996 "um endurgjaldsgrunn til alivinnuna" |
| Forskotsgrunnur fiskiflotans | Ll. nr. 71/1997 "um forskotsgrunn fiskiflotans" |
| Granskingargrunnurin | Ll. nr. 85/2001 "um gransking" |
| Búnaðargrunnurin | Ll. nr. 21/2004 "um Búnaðargrunn" |

[4] Grunnurin verður væntandi tikin av í 2007.

[5] Sambært álitinum frá november 2001 frá Fíggjarmálaráðnum er talan um ein veruligan grunn, ið eigur seg sjálvan. Grunnurin skal sambært álitinum ikki við í fíggjarlóg, og skal ikki við sum eksternur grunnur í lands-roknskapin.

## 7.3 Lógarásetingar

Vísandi til **fylgiskjal 7** er í fleiri førum einki ásett um virksemi, fyrisitingarútreiðslur, roknskap- og grannskoðanarviðurskifti í lógunum um hesar grunnar, og í fleiri førum eru sera ymiskar ásetingar og orðingar. Niðanfyri er greitt frá um nakrar ásetingar.

### *7.3.1 Um virksemi*

- Vinnuframagrunnurin: Fíggjarætlan grunsins verður tikin við á Løgtingsins fíggjarlóg
- Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar: Fíggjarliga grundarlag grunsins er gjald frá alarum og árliga játtanin á løgtingsfíggjarlógini.
- Mentanargrunnur landsins: Inntøkur grunsins eru avkast av stovnsfænum og studningur yvir fíggjarløgtingslógina.
- Granskingargrunnurin: Grunnurin fær árliga játtan á løgtingsfíggjarlógini.

### *7.3.2 Um fyrisitingarútreiðslur*

- Vinnuframagrunnurin: Sambært K. nr. 142/2001 "um umsiting og virksemi hjá Vinnuframagrunninum" verða rakstrarútreiðslur og rakstrarinntøkur hjá grunninum ikki tiknar við í fíggjarløgtingslógina.
- Forskotsgrunnur fiskiflotans: Lønjavningarstovan fyrisitur dagliga virksemi grunsins. Útreiðslurnar av fyrisitingini verða goldnar av grunninum.
- Búnaðargrunnurin: Inntøkur og útreiðslur hjá Búnaðargrunninum skulu ikki takast við í løgtingsfíggjarlóg.

Fyrisitingarútreiðslurnar hjá Mentanargrunninum og Granskingargrunninum (Granskingarráðnum) verða játtaðar á løgtingsfíggjarlógini á serstakari høvuðskontu.

### *7.3.3 Um roknskaparviðurskifti*

- Vinnuframagrunnurin: Grunnurin hevur sjálvstøðugan roknskap og fíggjarstøðu í landsroknskapinum.
- Forskotsgrunnur fiskiflotans: Grunnurin letur frá sær ársroknskap og ársfrágreiðing um virki grunsins, sum verður at almannakunngera.
- Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar: Roknskaparhaldið liggur á Føroya Gjaldstovu.
- Granskingargrunnurin: Grannskoðaður roknskapur og grannskoðarafrágreiðing fyri grunnin skulu fyri 1. juni á hvørjum ári verða sendur landsstýrismanninum í granskingarmálum til góðkenningar.
- Grunnur ætlaður brekaðum: Roknskapurin verður, saman við viðmerkingum frá grannskoðaranum, sendur Landsstýrinum til góðkenningar.

### *7.3.4 Um grannskoðaraviðurskifti*

- Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar: Grannskoðanardeild Landskassans hevur grannskoðanina um hendi.
- Vinnuframagrunnurin: Roknskapirnir verða grannskoðaðir av løggildum grannskoðara.

- Forskotsgrunnur fiskiflotans: Roknskapurin skal verða grannskoðaður av løggildum grannskoðara.
- Granskingargrunnurin: Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara.
- Grunnur ætlaður brekaðum: Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara, sum stýrið tilnevnir.
- Búnaðargrunnurin: Roknskapirnir hjá Búnaðargrunninum verða grannskoðaðir av løggildum grannskoðara. Roknskapirnir verða lagdir fyri Løgtingið sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini.

# 8 Internir grunnar

## 8.1 Søgulig gongd

Við Ll. nr. 33/1992 “um avtøku av landskassagrunnum” vórðu 71 landskassagrunnar tiknir av, og 14 grunnar vórðu verandi landskassagrunnar:

- Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins.
- Apoteksgrunnurin
- Grunnur nýggj sjónleikahús.
- Grunnur havrannsóknarskip.
- Grunnur yvirtøku av sermálum.
- Byggigrunnur Strandferðslan.
- Grunnur SU-lærlingastudningur.
- Útbúgvingargrunnurin.
- Grunnur studningur til lærlingar.
- Grunnur heilsufrøðilig Starvsstova.
- Grunnur nýtt vaktarskip.
- Grunnur umvælingarstudningur til friðað hús.[6]
- Grunnur skjalasavn.
- Grunnur kirkjan í Keypmannahavn.

Við Ll. nr. 94/1997 “um avtøku av landskassagrunnum” vórðu 11 av hesum landskassagrunnum tiknir av, og bert 3 grunnar vórðu varðveittir sum sokallaðir internir grunnar:

1. Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins.
2. Apoteksgrunnurin.
3. Grunnur umvælingarstudningur til friðað hús.

Sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið hevur ein internur grunnur hesi eyðkenni:

- Grunnurin er tikin við í fíggjarstøðu landskassans.
- Ognin hjá grunninum (tøkur peningur og) útlán er sett undir teir ymisku aktivbólkarnar í fíggjarstøðuni og passivini undir ”útjavningarkontu” í fíggjarstøðuni.

Ført verður eisini fram, at :

> *“Um peningur skal gjaldast úr internu grunnunum, so skal í flestu førum veitast játtan beinleiðis yvir fíggjarlógina. Útgjaldingar úr eksternu grunnunum* <u>*kunnu*</u> *fara fram uttan játtan á fíggjarlógini, um so er, at grunnarnir eiga innistandandi pening. T.v.s. at sjálvt um internu grunnarnir ikki eru tiknir av, so kann Landsstýrið ikki játta pening til endamálið, um ikki játtan eisini er til tað á fíggjarlógini.*

Í skrivi 4. juni 1998 til Fíggjarmálaráðið umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. teir seinastu internu grunnarnar soleiðis:

[6] Landskassagrunnarnir ”Savn í Hoyvík” og ”Gomul prestahús á Nesi” vórðu lagdir saman við grunninum ”Umvælingarstudningur til friðað hús”.

<u>1. Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins:</u>

*"Nevnast kann, at løgtingsgrannskoðararnir í 1996 bóðu postmeistaran um eina frágreiðing um henda grunn. Postmeistarin svaraði, at grunnurin "ikki ekstisterar meira", og at tað, sum kanska heldur misvísandi verður kallað "Byggi- og Rakstrargrunnur Postverksins", er ein kapitalkonta, sum vísir eginognina.*

*Millumrokningin við landskassan/eginognin hjá Postverkinum verður í landsroknskapinum tikin við á fíggjarstøðuni undir "Kapitalogn í landsfyritøkum", og sama upphædd gongur aftur í Byggi- og rakstrargrunni Postverksins undir internum grunnum í einum fylgiskjali til landsroknskapin. Onki verður játtað í grunnin, og ongin nýtsla fer fram úr hesum "grunni". Hesin "interni grunnur" hevur sostatt als onga funktión. Játtanin til Postverkið verður tikin við á fíggjarlógini undir samferðslu/samskifti, seinnu árini við játtanarslagnum "Landsfyritøka"."*

<u>2. Apoteksgrunnurin:</u>

*"Nógv brævaskifti hevur verið ímillum løgtingsgrannskoðararnar, Grannskoðanardeildina, Gjaldstovuna og Almanna- og Heilsumálastýrið um henda grunn, serliga í sambandi við, at grunnurin í 1997 keypti ein bygning fyri 9 mió.kr. Í skrivi dagfest 4. februar 1998 kom Grannskoðanardeildin til hesa niðurstøðu:*

*"Vísandi til tað, sum ført er fram í hesum skrivi og í skrivi/notati okkara dagfest 16. januar 1998, heldur Grannskoðanardeildin, at ein landsstýrismaður ikki hevur heimild til, vegna Apoteksgrunnin, ið er ein internur grunnur, at keypa ein bygning ella annað, uttan at fíggjarheimild fyrst er fingin til vega frá Løgtinginum, antin á fíggjarlóg ella í aðrari játtanarlóg, ið heimilar tílíkari útreiðslu/"dispositión". Grannskoðanardeildin metir, at Almanna- og Heilsumálastýrið í brævaskiftinum okkara millum ikki hevur ført fram nøkur sjónarmið, sum kunnu nýtast sum grundarlag fyri at koma til eina aðra niðurstøðu."*

*Grannskoðanardeildin helt, at tað, sum hevði stórst týdning í hesum máli, var at finna fram til eina hóskandi skipan fyri, á hvønn hátt virksemið hjá Apoteksverkinum/Apoteksgrunninum aftur verður tikið við á fíggjarlógina. T.v.s. eina skipan, sum tryggjar áhugamálini hjá Løgtinginum (sum játtandi myndugleiki), hjá landsstýrismanninum/-aðalstýrinum, sum hevur ábyrgd/eftirlit við játtanini/lógini, umframt greið viðurskifti hjá dagligu leiðsluni. Víst varð eisini til viðmerkingarnar í uppskoti til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um góðkenning av roknskapinum fyri 1996.*

*Vísandi til lógina um apoteksverkið og heilivág frá 1988 segði Almanna- og Heilsumálastýrið seg ivast í, um nøkur djúpari meining var við Apoteksgrunninum. Hesin var óivað tikin við, tí hann var við frammanundan. Almanna- og Heilsumálastýrið metti, at í sambandi við eina endurskoðan av lógini, átti mann at umhugsa, um tað er nøkur meining í at halda fram við hesari skipan."*

<u>3. Grunnur umvælingarstudningur til friðað hús:</u>

*"Onki verður játtað í grunnin, og ongin nýtsla fer fram úr hesum "grunni". Í landsroknskapinum hevur grunnurin staðið sum ein óbroytt millumrokning síðani 1991."*

## 8.2 <u>Internir grunnar 2006</u>

Byggi- og rakstrargrunnur Postverksins "hvarv" úr landsroknskapinum 2004, og sambært landsroknskapinum 2005 eru bert 2 internir grunnar eftir:

1. Apoteksgrunnurin
2. Grunnur umvælingarstudningur til friðað hús

*ad 1)* <u>Apoteksgrunnurin:</u>

Í “Áliti um Apoteksverkið í framtíðini”, sum ein arbeiðsbólkur 6. juli 2006 handaði landsstýrismanninum í heilsumálum, verður mælt til, at “*Apoteksverkið verður skipað sum eitt sjálvstøðugt fyrisitingarsubjekt. Hetta ber við sær, at lógarásetingar skulu gerast fyri Apoteksverkið, við neyvum heimildum og ábyrgdum fyri stovnin. Tað kann gerast við broytingum í verandi løgtingslóg, ella um neyðugt við nýggjari serlóg* .“

*ad 2)* Grunnur umvælingarstudningur til friðað hús:

Í juli 1999 boðaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum frá, at “*hann í komandi tingsetu fer at leggja uppskot fyri tingið um avtøku av “Grunninum til umvælingarstudning til friðað hús”* ”.

Einki uppskot tykist vera lagt fyri Løgtingið, hvørki tá ella síðani.

# 9 Fylgiskjal 1: Stovnar/grunnar, fíggjarstøðan 2006

Á talvuni niðanfyri hava vit tikið samanum høvuðstølini í fíggjarstøðuni 2006 hjá 11 stovnum/grunnum, sum sambært Fíggjarmálaráðnum eru ogn landskassans:

mió.kr.

| | Aktiv | | | | | Passiv | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Virðis-brøv** | **Útlán** | **Áogn o.a.** | **Tøkur pen-ingur** | **Til-sam-ans** | **Skuld** | **Egin-ogn** | **Til-sam-ans** |
| *Landsgrunnar/ -stovnar* | | | | | | | | |
| Húsalánsgrunnurin | 145 | 131 | 22 | 170 | 468 | 7 | 461 | 468 |
| Bjálvingarstuðulsláns-grunnurin | 0 | 58 | 0 | 7 | 65 | 2 | 63 | 65 |
| Íbúðagrunnurin | 0 | 12 | 10 | 2 | 24 | 12 | 12 | 24 |
| Arbeiðsloysisskipanin | 510 | 0 | 4 | 38 | 552 | 5 | 547 | 552 |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunnurin | 286 | 0 | 18 | 137 | 441 | 1 | 440 | 441 |
| Føroya Realkreditstovnur | 115 | 514 | 3 | 2 | 634 | 19 | 615 | 634 |
| Landsbankin, netto | 0 | 0 | 0 | 139 | 139 | 0 | 139 | 139 |
| Frítíðargrunnurin[7] | 0 | 0 | 0 | 16 | 16 | 1 | 15 | 16 |
| Sjálvsognarstovnurin "Sambýlir" | 0 | 0 | 10 | 1 | 11 | 7 | 4 | 11 |
| Sjálvsognarstovnurin á Mýrini/Grønlandsvegi[8] | 0 | 0 | 2 | 1 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| Fróðskaparsetur Føroya sjálveigandi stovnur | 0 | 0 | 4 | 1 | 5 | 2 | 3 | 5 |
| **Landsgrunnar/ -stovnar tilsamans** | **1.056** | **715** | **73** | **514** | **2.358** | **57** | **2.301** | **2.358** |

7 Fyribils roknskapartøl 2006
8 Roknskapartøl 2005

# 10 Fylgiskjal 2: Partabrøv, fíggjarstøðan 2006

t.kr.

| Skrásett í | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Landsroknskapinum | Upphædd | Upphædd | Upphædd | Upphædd |
| P/f Atlantic Airways | 127.000 | 75.000 | 75.000 | 75.000 |
| P/f Tjaldur | 140 | - | - | - |
| P/f Elektron | 2.347 | 2.347 | 2.347 | 2.347 |
| P/f Flogsamband | - | - | 1.521 | 1.521 |
| P/f Fiskaaling | 4.635 | 4.635 | 4.635 | 2.635 |
| P/f Føroya Banki | 1 | 1 | 1 | 1 |
| P/f Føroya Dátusavn | 200 | 200 | 200 | 200 |
| P/f Føroya Lívstrygging | 500 | 500 | 500 | 500 |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 77.948 | 77.948 | 77.948 |
| Nordatlantisk Turistselskab Aps. | 66 | 66 | 66 | - |
| P/f Norðoyatunnilin | 127.500 | 95.000 | 62.500 | 62.500 |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 43.000 | 21.500 | - |
| P/f Skipafelagið Føroyar | - | 70 | 70 | 70 |
| L/f Skopunar Útróðrarfelag | 50 | 50 | 50 | 50 |
| P/f Smyril Line | 2.760 | 2.760 | 2.760 | 2.760 |
| P/f Tvøroyrar Flakavirki | - | - | 820 | 820 |
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 160.300 | 140.300 | 120.300 |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 20 | 20 | 20 |
| P/f Virðisbrævamarknaður Føroya | 4.200 | 4.200 | 4.200 | 4.200 |
| **Partabrøv tilsamans** | **550.667** | **466.097** | **394.438** | **350.872** |
| Keypsskála skrásett virðisbrøv, Postverk Føroya | - | - | 29.453 | 29.572 |
| **Virðisbrøv tilsamans** | **550.667** | **466.097** | **423.891** | **380.444** |

Landið eigur allan partapeningin í 7 feløgum: P/f Atlantic Airways, P/f Fiskaaling, P/f Føroya Lívstrygging, P/f Føroya Tele, P/f Norðoyatunlinum, P/f Postverki Føroya og P/f Vágatunlinum.

Ultimo 2005 átti Landsstýrið sambært landsroknskapinum 50 t.kr. í lutabrøvum í L/f Skopunar Útróðrarfelag. Fiskimálaráðið kunnaði í september 2003 um, at peningurin upprunaliga varð settur í felagið í 1968, og at felagið varð umskipað/endurreist í 1993, eftir at virksemið í felagnum var steðgað upp. Vit hava áður mælt Fiskimálaráðnum til at fáa greiði á, um innskotið frá 1968 er mist.

Í november 2005 boðaði Vinnumálaráðið almenninginum frá, at Føroya Banki, vegna Vinnumálaráðið, skuldi selja partabrøvini, sum landskassin átti í P/f Tjaldur. Minstiprísurin, sum Vinnumálaráðið vildi hava fyri partabrøvini, var innara virðið. Navnaupphæddin á partabrøvum landskassans í P/f Tjaldur er 140.000 kr. og innara virðið 3,1 mió.kr. Partabrøvini í P/f Tjaldur eru ikki seld enn. Partabrøvini hava higartil ikki verið skrásett í landsroknskapinum, men tey eru nú skrásett í landsroknskapinum 2006.

Landið eigur 40%, 48 t.kr., av partapeningunum í Sp/f Atlanticon. Partabrøvini eru ikki skrásett í landsroknskapinum. Vinnumálaráðið boðaði í september 2007 frá, at Vinnumálaráðið ætlar at selja partabrøvini við at lýsa tey til sølu í einum av peningastovnunum, í fyrsta lagi til hægstbjóðandi, og í øðrum lagi ikki fyri minni enn innara virðið. Partabrøvini í Sp/f Atlanticon eru ikki seld enn.

## 11 Fylgiskjal 3: Eksternir grunnar, fíggjarstøðan 2006

Í talvuni niðanfyri hava vit tikið samanum høvuðstølini í fíggjarstøðuni 2006 hjá 8 "eksternum" grunnum, sum eru við í landsroknskapinum sum fylgiskjøl, men ikki við í fíggjarstøðuni á s. 6-7 í landsroknskapinum 2006:

mió.kr.

| | Aktiv | | | | | Passiv | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Virðis -brøv** | **Útlán** | **Áogn o.a.** | **Tøkur pen-ingur** | **Til-sam-ans** | **Skuld** | **Egin-ogn** | **Til-sam -ans** |
| ***Eksternir landsgrunnar:*** | | | | | | | | |
| Vinnuframagrunnurin[9] | 0 | 0 | 0 | 53 | 53 | 9 | 44 | 53 |
| Mentanargrunnur landsins | 0 | 0 | 0 | 5 | 5 | 0 | 5 | 5 |
| Granskingargrunnurin | 0 | 0 | 10 | 0 | 10 | 10 | 0 | 10 |
| Grunnur ætlaður brekaðum | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 | 1 |
| Búnaðargrunnurin | 132 | 70 | 0 | 52 | 254 | 2 | 252 | 254 |
| Forskotsgrunnur fiskiflotans | 0 | 0 | 7 | 20 | 27 | 0 | 27 | 27 |
| Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar[10] | 0 | 0 | 0 | 7 | 7 | 0 | 7 | 7 |
| Grunnurin Kirkjubømúrurin[11] | 0 | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Eksternir landsgrunnar, tilsamans** | **132** | **70** | **17** | **138** | **357** | **21** | **336** | **357** |

[9] Sambært eksterna roknskapinum er eginognin 5 mió.kr. størri, sum svarar til virðið av grundøki og bygningum.
[10] Grunnurin verður væntandi tikin av í 2007.
[11] Sambært álitinum frá november 2001 frá Fíggjarmálaráðnum er talan um ein veruligan grunn, ið eigur seg sjálvan. Grunnurin skal sambært álitinum ikki við í fíggjarlóg, og skal ikki við sum eksternur grunnur í landsroknskapin. Sambært landsroknskapinum 2005 er eginognin 62 t.kr.

## 12 Fylgiskjal 4: Stovnar/grunnar, virksemi og fyrisitingarútreiðslur

Í landsroknskapinum finnast ikki upplýsingar um roknskapartøl hjá øllum stovnum/-grunnum, sum landið sambært Fíggjarmálaráðnum eigur, og sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Á talvuni niðanfyri hava vit sett upp nøkur høvuðstøl fyri inntøkur og útreiðslur í 2006 hjá 11 stovnum/grunnum, sum ikki eru við á fíggjarlógini/í landsroknskapinum:

t.kr.

| | Rakstrar-inntøkur | Skattur og avgjøld | Rentu-inntøkur o.l. | Rentu-útreiðslur o.l. | Tilskot til einstak-lingar | Lønir | Aðrar fyrisitingar útreiðslur | Aðrar út-reiðslur[12] | Nettotøl |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Húsalánsgrunnurin | 200 | 0 | 11.584 | -660 | 0 | -4.502 | -828 | 0 | 5.794 |
| Bjálvingarstuðuls-lánsgrunnurin | 92 | 0 | 290 | 0 | 0 | 0 | -778 | 0 | -396 |
| Íbúðagrunnurin | 0 | 0 | 353 | 0 | 0 | 0 | -297 | 0 | 56 |
| Arbeiðsloysisskipanin | 0 | 130.283 | 15.509 | 0 | -86.532 | -5.858 | -4.649 | -2.227 | 46.526 |
| Arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnurin | 0 | 135.579 | 17.700 | 0 | -82.031 | -155 | -1.677 | -2.453 | 66.963 |
| Føroya Realkreditstovnur | 0 | 0 | 30.283 | -449 | 0 | -2.134 | -1.012 | -4.117 | 22.571 |
| Landsbankin | 1.423 | 0 | 63.573 | -46.638 | 0 | -4.641 | -3.158 | -70 | 10.489 |
| Frítíðargrunnurin[13] | 0 | 0 | 1.188 | 0 | 0 | -23 | -578 | 0 | 587 |
| Sjálvsognarstovnurin Sambýlir | 852 | 0 | 18 | -311 | 0 | -14 | -296 | -382 | -133 |
| Sjálvsognarstovnurin á Mýrini/Grønlandsvegi[14] | 216 | 0 | 0 | -13 | 0 | 0 | -41 | | 162 |
| Fróðskaparsetur Føroya sjálveigandi stovnur | 55 | 0 | 110 | -10 | 0 | 0 | -86 | -96 | -27 |
| **Grunnar/stovnar tilsamans** | **2.838** | **265.862** | **140.608** | **-48.081** | **-168.563** | **-17.327** | **-13.400** | **-9.345** | **152.592** |

[12] Kurstap, avskrivingar, skattur o.l.
[13] Fyribils roknskapartøl 2006
[14] Roknskapartøl 2005

# 13 Fylgiskjal 5: Eksternir grunnar, virksemi og fyrisitingarútreiðslur 2006

Í talvuni niðanfyri hava vit sett upp nøkur høvuðstøl fyri inntøkur og útreiðslur í 2006 hjá 8 "eksternum" grunnum, sum eru við í landsroknskapinum sum fylgiskjøl:

t.kr.

| | Rakstrar-inntøkur | Rentu-inntøkur o.l. | Játtan á fíggjar-Lógini | Lønir | Aðrar fyrisitingar-útreiðslur | Aðrar útreiðslur | Tilskot til einstaklingar/ vinnu/annað virksemi | Nettotøl |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframagrunnurin | 532 | 1.452 | 3.100 | -768 | -680 | 0 | -5.647 | -2.011 |
| Mentanargrunnur landsins | 11 | 86 | 4.500 | -2.685 | -2 | 0 | -2.332 | -422 |
| Granskingargrunnurin | 2 | 0 | 6.180 | 0 | -2 | 0 | -6.218 | -38 |
| Grunnur ætlaður brekaðum | 19 | 12 | 0 | 0 | -14 | 0 | -229 | -212 |
| Búnaðargrunnurin[15] | 401 | 7.680 | 0 | -1.655 | -907 | -2.422[16] | 0 | 3.097 |
| Forskotsgrunnur fiskiflotans | 407 | 1.032 | 0 | -47 | -259 | 0 | 0 | 1.133 |
| Endurgjaldsgrunnur alivinnunnar | 0 | 104 | 0 | -25 | 0 | 0 | 0 | 79 |
| Grunnur in Kirkjubømúrurin | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| **Eksternir grunnar** | **1.372** | **10.367** | **13.780** | **-5.180** | **-1.864** | **-2.422** | **-14.426** | **1.627** |

[15] Jarðarsøla, aðrar inntøkur og stuðul úr Búnaðargrunninum til festarar verður ikki tikið við í rakstrarroknskapinum, men í notu til eginognina í eksternum roknskapinum verður víst til eina samlaða festikontu. Sambært § 5 í Ll. nr. 21 frá 17. mai 2004 "um Búnaðargrunn" verður peningurin fyri jarðarsølu goldin inn í Búnaðargrunnin og verður bókaður á kontu hjá avvarðandi festi. Búnaðargrunnurin kann veita fíggjarligan stuðul til íløgur á festinum við peningi av festikontuni, og grunnurin viðger umsóknir um stuðul eftir somu reglum, sum umsóknir um lán.

Viðvíkjandi lánsvirksemi sæst einans, hvussu stórar rentuinntøkurnar eru. Útlán v.m. og aftur-gjaldan av útlánum v.m. eru ikki útgreinað í landroknskapinum. (Tað verður útgreinað á standardkontu 82 og 86 á fíggjarlógini og í landsroknskapinum, tá ið talan er um t.d. lestrarlán).

[16] Gjald til Búnaðarstovuna. (Búnaðargrunnurin fíggjar raksturin av Búnaðarstovuni).

# 14 Fylgiskjal 6: Stovnar/grunnar, lógarásetingar

Í talvuni niðanfyri er greitt frá lógarásetingum um virksemi, fyrisitingarútreiðslur, roknskapar- og grannskoðaraviðurskifti hjá landsstovnum/grunnum o.t.

| Navn | Lógar-grundar-lag | Um virksemið | Um fyri-sitingar-útreiðslur | Um rokn-skaparviður-skifti | Um grannskoðan |
|---|---|---|---|---|---|
| Húsaláns-grunnurin | Ll. nr. 118/1997<br>K. nr. 55/1998 | § 4. Grunninum er heimilað við heimild í løgtingslóg í hvørjum einstøkum føri at taka lán. | Einki ásett. | § 31, stk. 3. Grann-skoðaðu roknskap-irnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum stýrisins. | § 31, stk. 2. Roknskapirnir sambært 1. stk. verða grann-skoðaðir av løggildum grannskoðara. |
| Bjálvingar stuðulsláns -grunnurin | Ll. nr. 118/1997<br>K. nr. 55/1998 | § 15. Bjálvingar-stuðulslánsgrunnurin fær árliga játtan á fíggjarløgtings-lógini. | Einki ásett. | § 31, stk. 3. Grann-skoðaðu roknskap-irnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum stýrisins. | § 31, stk. 2. Roknskapirnir sambært 1. stk. verða grann-skoðaðir av løggildum grannskoðara. |
| Íbúða-grunnurin | Ll. nr. 118/1997<br>K. nr. 55/1998 | § 17. Stovnsfæ íbúðagrunsins er tann peningur, sum játtaður verður á fíggjarløgtingslógini. *Stk. 2.* Íbúðagrunninum er hei-milað at upptaka neyðug lán til fígging av íbúðahúsum. | Einki ásett. | § 31, stk. 3. Grann-skoðaðu roknskap-irnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing og viðmerkingum stýrisins. | § 31, stk. 2. Roknskapirnir sambært 1. stk. verða grann-skoðaðir av løggildum grannskoðara. |
| Arbeiðs-loysis-skipanin | Ll. nr. 113/1997 | § 2. Inntøkur stovnsins verða útvegaðar við gjøldum frá teimum, sum taka ímóti A-inntøku, teimum sum rinda A-inntøku, gjøldum frá sjálvstøðugt vinnurekandi og frá persónum, sum hava teknað sjálvbodnar skipanir. | Einki ásett. | § 5. Roknskaparárið er álmanakkaárið. | § 5, stk. 2. Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara. |
| Arbeiðs-marknaðar eftirlønar-grunnurin | Ll. nr. 39/1991 | §2. Fæ grunsins verður fingið til vega við, at allir persónar árliga rinda grunninum ein prosentpart av teirri inntøkuni, sum myndar grundarlagið undir skattaútrokningini, og allir arbeiðsgevarar árliga rinda grunninum ein prosentpart av útgoldnum A-inntøkum. | Einki ásett. | Einki ásett. | Einki ásett. |
| Føroya Real-kredit-stovnur | Ll. nr. 75/1998 | § 7. Umframt grundfæið kann stovnurin útvega sær útláns-pening við útgávu av skuldar-brøvum ella handhavara-lánsbrøvum ljóðandi uppá stovnin samsvarandi reglunum í viðtøkum stovnsins. | Einki ásett. | § 14. Stovnurin ger í hvørjum roknskap-arári ársroknskap við uppgerð av úrsliti, javna, viðmerkingum og ársfrágreiðing. Ársroknskapurin skal sýna rættvísandi mynd av ogn og skuld stovnsins, fíggjarligu støðuni og úrslitinum. Ársroknskapurin skal verða gjørdur sam-svarandi góðum roknskaparsiði. | § 15. Ársroknskapurin verður grannskoðaður av einum ríkisgóðkendum grannskoðara, valdum av stjórnini.<br>§ 16. Grannskoðaði ársroknskapurin við undir-skriftum og góðkenning stjórnarinnar verður lagdur fyri umboðsnevndina til ummælis og síðan sendur landsstýrismanninum saman við viðmerkingum grann-skoðarans í seinasta lagi 4 mánaðir eftir roknskapar-árslok.<br>Stk. 2. Í seinasta lagi 1 mánað eftir hvørt fjórðingsárslok sendir stjórnin landsstýrismann-inum úrtak av roknskapum stovnsins. |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Lands-bankin | Ll. nr. 57/1978<br><br>K. nr. 150/1992 | § 3. Stovnsfæ bankans er 50 milliónir kr. | Einki ásett. | § 16. Roknskaparár bankans er álmanak-kaárið.<br>§ 21, stk. 2, í K. 150/1992. Áðrenn 1. februar letur stjórin frá sær roknskap og frágreiðing um virki bankans í undanfarna ári til grannskoðaran, umsjónarráðið hevur valt. | § 18. Roknskapur bankans skal grannskoðast av lgg-ildum grannskoðara, sum umsjónarráðið velur á hvørjum ári.<br>§ 21, stk. 3, í K. 150/1992. Í seinasta lagi 1. apríl skal grannskoðaði roknskapurin fyri undanfarna ár leggjast fyri umsjónarráðið við til-mæli frá nevndini og stjórnini um býtið av rakstraryvirskotinum.<br>Stk. 4. Roknskapurin, góðkendur av umsjónar-ráðnum, verður saman við frágreiðing um virki bankans almannakunn-gjørdur, og verður sendur Landsstýrinum. |
| Frítíðar-grunnurin | Ll. nr. 30/1986<br><br>K. nr. 101/1988 | § 21, stk. 2. Fæ grunsins fæst til vega frá rentuinntøkum smbrt. § 20 a, stk. 5 og avkasti av fænum, og peningi, sum sambært § 18 í løgtingslóg um frítíð við løn er ogn grunsins. Harafturat hoyrir til fæ grunsins tann upphædd, sum 1. apríl 1986 sambært landskas-sans roknskapi stóð í grunn-inum. | § 20a, stk.6. Toll- og Skattstova Føroya fyrisitur inn- og útgjald-ingina av frítíð-arløn og frítíð-arkontu. Løntakarafeløg-ini og frítíðar-konta rinda Toll- og Skattstovu Føroya fyri um-siting sambært hesari lóg. | § 21, stk.5. Rokn-skaparár grunsins er álmanakkaárið. Nevndin hevur skyldu at lata gera ársroknskap fyri farna árið við fíggjar-støðu tann 31. des-ember. | § 21, stk. 5, 3. pkt. Nevndin velur løggildan grannskoð-ara fyri eitt 3-ára skeið til at grannskoða roknskapirnar, sum verða sendir Lands-stýrinum á hvørjum ári innan 1. juni. |
| Sjálvs-ognarstovn-urin “Sam-býlir” | Viðtøkur frá 14/12/1999 | § 3, stk. 2. Stovnurin hevur heimild til at upptaka lán. | Einki ásett. | § 10, stk. 4. Rokn-skapurin skal latast Almanna- og Heilsu-málastýrinum. | § 11. Roknskapurin skal á hvørjum ári grannskoðast av einum løggildum grannskoðara. |
| Sjálvs-ognarstovn-urin á Mýrini /Grøn-landsv. | Viðtøkur frá 22/3-1999 | Einki ásett. | Einki ásett. | § 10, stk. 4. Rokn-skapurin skal latast Almanna- og Heilsu-málastýrinum. | § 11. Roknskapurin skal á hvørjum ári grannskoðast av einum løggildum grannskoðara. |
| Fróð-skaparsetur Føroya – sjálveigand i stovnur | Ll. nr. 65/1987 | § 4. stk.2. Fróðskaparsetrinum verður heimilað at útvega sær ymsar inntøkur og stuðul til ávís endamál. | § 4. Útreiðslur-nar, ið standast av rakstri Fróð-skaparsetursins, verða bornar av landskassanum við játtan á løg-tingsfíggjarlógini | Einki ásett. | Einki ásett. |

# 15 Fylgiskjal 7: Eksternir grunnar, lógarásetingar

Í talvuni niðanfyri er greitt frá lógarásetingum um virksemi, fyrisitingarútreiðslur, roknskapar- og grannskoðaraviðurskifti hjá eksternum grunnum.

| Navn | Lógar-grundar lag | Um virksemið | Um fyrisitingar-útreiðslur | Um roknskapar-viðurskifti | Um grann-skoðan |
|---|---|---|---|---|---|
| Vinnuframa-grunnurin | Ll. nr. 81/2001<br>K. nr. 142/2001 | § 2. Vinnuframagrunnurin verður skipaður sum eksternur grunnur. Stovnsfæ grunsins verður útvegað við avtøku av fimm øðrum vinnuframa-grunnum hjá landinum. Harumframt kann grunnurin fáa ein árligan stuðul á Løgtingsins fíggj-arlóg.<br>§ 2, stk. 3. Fíggjarætlan grunsins verður tikin við á Løgtingsins fíggjarlóg. | § 11 í K. 149/2001. Rak-strarútreiðslur og rakstrarinntøkur hjá grunninum verða ikki tiknar við í fíggjar-løgtingslógina. | § 2, stk. 2. Grunnurin hevur sjálvstøðugan rokn-skap og fíggjarstøðu í land-sroknskapinum.<br>§ 6, stk. 2. Grannskoðaðu roknskapirnir verða sendir landsstýrismanninum við frágreiðing um virksemið í farna árinum | § 6. Roknskapirnir verða grannskoðaðir av løggildum grann-skoðara. |
| Mentanar-grunnur landsins | Ll. nr. 84/2000 | § 2, stk. 2. Inntøkur grunsins eru avkast av stovnsfænum og studn-ingur yvir fíggjarløgtings-lógina. | Einki ásett.[17] | Einki ásett. | Einki ásett. |
| Granskingar-grunnurin | Ll.nr. 85/2001 | § 2. Granskingargrunnurin fær árliga játtan á løgtings-fíggjarlógini. | Einki ásett.[18] | § 17. Í roknskapar-viðurskiftum eru reglur um almenna roknskaparhaldið galdandi.<br>§ 18. Grannskoðaður roknskapur og grannskoð-arafrágreiðing fyri grunnin skulu fyri 1. juni á hvørjum ári sendast landsstýris-manninum í granskingar-málum til góðkenningar. | § 17, stk. 4. Rokn-skapurin verður grannskoðaður av løggildum grann-skoðara. |
| Grunnur ætlaður brekaðum | Ll. nr. 49/1950<br>K. nr. 91/1987 v.s.b. | § 1, litra f. Yvirskotið av happadráttinum verður býtt soleiðis, at 1/3 verður latin til Í.S.F., meðan 2/3 verða settir í grunn, ætlaður brekaðum. | Einki ásett. | § 5 í K. 91/1987. Roknskaparárið fyri grunnin er álmanakkaárið. *Stk 3.* Roknskapurin verður saman við viðmerkingum frá grann-skoðaranum sendur Landsstýrinum til góðkenningar. | § 5, stk. 2. í K. 91/1987. Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grann-skoðara, sum stýrið tilnevnir. |
| Búnaðar-grunnurin | Ll. nr. 21/2004 | § 13. Inntøkur og útreiðslur hjá Búnaðargrunninum skulu ikki takast við í løgtings-fíggjarlóg. | § 13. Inntøkur og útreiðslur hjá Búnað-argrunninum skulu ikki takast við í løgtingsfíggjarlóg. | § 14. Roknskaparhaldið skal fylgja lógini um landsins almenna roknskaparhald v.m., tó soleiðis, at niðurskrivingar móti væntandi tapum upp á útlán roknskaparliga skulu viðgerast samsvarandi reglunum fyri peninga-stovnarnar. | § 14, stk.2. Rokn-skapirnir hjá Búnaðargrunn-inum verða grannskoðaðir av løggildum grann-skoðara.<br>§ 14, stk.2. Rokn-skapirnir verða lagdir fyri Løg-tingið sambært á-setingunum í stýrisskip-anarlógini. |

[17] Fyrisitingarútreiðslur til Mentanargrunnin verða játtaðar á løgtingsfíggjarlógini á serstakari høvuðskontu.
[18] Fyristingarútreiðslur til Granskingarráðið, ið umsitur Granskingargrunnin, verða játtaðar á løgtings-fíggjarlógini á serstakari høvuðskontu.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Forskots-grunnur fiskiflotans | Ll. nr. 71/1997 | Einki ásett. | § 4. stk. 2. Dagliga virksemi grunsins fyrisitur Lønjavningarstovan. Útreiðslurnar av fyrisitingini verða goldnar av grunninum. | § 5. Grunnurin letur frá sær ársroknskap og ársfrágreiðing um virki grunsins, sum verður at almannakunngerða. | § 5. Roknskapurin skal grannskoðast av løggildum grannskoðara. |
| Endurgjalds grunnur alivinn-unnar | Ll. nr. 87/1996<br>K. nr. 155/1997 | § 6. Fíggjarliga grundarlag grunsins er gjald frá alarum og árliga játtanin á løgtingsfíggjarlógini. Alarar og landskassin gjalda ein part hvør. Smoltalarar og alarar á sjónum gjalda helvt um helvt.<br>*Stk. 2.* Inngoldið verður fyri fíggjarárini 1996, 1997 og 1998. Síðani skal grunnurin hvíla í sær sjálvum. | Einki ásett. | § 8, stk. 1 í K. nr. 155/1997. Roknskap-arhaldið liggur á Føroya Gjaldstovu.<br>*Stk. 2.* Roknskaparhaldið skal fylgja lógini um landsins almenna roknskaparhald v.m. | § 8, stk. 2. í K. 155/1997. Grann-skoðanardeild Landskassans hevur grannskoð-anina um hendi. |
| Grunnurin Kirkjubø-múrurin | K. nr. 52/1957 | § 2. Aftrat grundfæinum kunnu koma tilskot, sum veitt kunnu vera, og so mikið av innvunnum rent-um, sum Landsstýrið fyri-setur. | § 5. Føroya Landsstýri er stýri grunsins. | § 6. Føroya Gjaldstova heldur roknskapin. | § 6. Roknskapin verður endurskoð-aður av granns-koðara Løgtingsins og decideraður av Landsstýrinum. |